FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2016

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.tinganes.fo

# RØÐA LØGMANS

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Harra formaður**

»Vit fluttu heim fyri at byggja framtíðina«

So greið var havnarkvinnan, Brynhild, á einum tiltaki herfyri, tá ið hon skuldi lýsa, hví hon og maðurin, Bogi, fluttu aftur til Føroya. Tey fluttu heim fyri at byggja framtíðina. Eftir átta ár í útlegd var spenningurin stórur. Samstundis vóru tey stúrin. Mundu tey fara at trívast? Hvussu við børnunum? Men tey høvdu onga orsøk at stúra. Tey fullu til frá fyrsta degi. Og nú byggja Brynhild, Bogi og børnini land. Okkara land.

Fleiri av teimum, sum hava lisið ella starvast uttanlands, flyta nú heim aftur. Fólkatalið veksur, og tað rættar skeivu aldurssamansetingina, sum leingi hevur verið okkara fremsta avbjóðing. Leingi hevur aldursbólkurin undir 40 ár bara minkað, men nú eru broytingar at hóma, tí fleiri og fleiri ung leggjast afturat. Ikki minst kvinnur í burðarførum aldri flyta heimaftur, vísa hagtølini. Um gongdin heldur fram, verða vit í 2017 fyri fyrstu ferð 50.000 fólk í Føroyum.

Góða gongdin vekir góðar vónir.

Góðu gongdini eiga nógv sín lut í. Vinnan. Undanfarnar samgongur. Sitandi samgonga. Og ikki minst fólkið – kring alt landið – ið hevur skapt grundarlagið fyri, at gongdin er vend.

Góða gongdin stendur í andsøgn við døkku myndina fyri nøkrum fáum árum síðan. Tá valdaði svartskygni. Vit taptu kappingina við útheimin um okkara ungu. Vit taptu kappingina um útbúgving, um bústaðir, um spennandi størv og um sosialar veitingar. Føroyingar burturi og heima lýstu okkara samfelag sum myrkt. Avbyrgt. Trongt. Ja, so illa stóð til, at serfrøðingar óttaðust, at samfelagið fór at detta sundur um fá áratíggju, fingu vit ikki yngra ættarliðið at støðast.

Men góða gongdin ger, at vit nú eru millum heimsins fremstu tjóðir. Politikarar í øðrum londum spyrja, hvat vit gera rætt. Fregnast um okkara vælferð. Um okkara vøkstur. Um lága arbeiðsloysið. Um okkara dugnaligu alarar. Um fáu lógarbrotini. Um okkara framsøkni á grøna økinum. Og um okkara vælútbúna ungdóm.

Tað gekk illa. Men Brynhild, Bogi og børnini, sum hava valt Føroyar fram um útheimin, eru bert eitt dømi um, at tey ungu leita heim aftur. Tey vilja byggja framtíðina her. Tey vilja gera sítt saman við okkum, sum búgva her.

Men hóast tilflytingin er vaksandi, hóast skeivu tølini spakuliga rættast, hóast tað nú gongur væl á nógvum økjum, kunnu vit ikki bara seta okkum afturá. Skeiva aldurs- og kynssamansetingin er framvegis størsta avbjóðingin. Og hon má endurspeglast í raðfestingunum komandi árini. Vit mugu syrgja fyri, at tað verður so gott at búgva í Føroyum, at tey ungu ikki vilja búgva nakra aðra staðni. Samgongan er longu farin undir at gera neyðugu tillagingarnar og neyðugu broytingarnar. Vit eru á broytingarkós.

**Harra formaður**

»Ynskir mann at royna nakað nýtt í Føroyum; ynskir mann at bróta upp úr nýggjum og byrja nakað nýtt, so eru tað avgjørt møguleikar fyri tí. Mann skal bara hava hugin til tað. So kann mann«. Orðini eigur Sámal av Viðareiði, ið hevur lisið læknavísindi í USA og síðani arbeitt nøkur ár sum lækni í Onglandi. Nú er hann fluttur heim at starvast sum lækni á Landssjúkrahúsinum. Sámal er fluttur heim við tí í hyggju at byggja land. Okkara land.

Og eg eri samdur við Sámali. Vit hava góðar møguleikar at bróta upp úr nýggjum. Hava vit hugin til tað. Hava vit áræðið til tað. Dirvið til tað.

Nógv hevur verið tosað um nýskipanir. Tær eru tó altíð komnar í drag.

Men Føroyar eru á broytingarkós. Tað var ein nýskipanarhugað samgonga, sum tók við farna heyst. Ein samgonga, sum hevur sett sær fyri at fremja nakrar av teimum neyðugu broytingunum, vit so leingi hava tosað um. Føroyar eru nú á broytingarkós, og málið er einar samhaldsfastar, sjálvbjargnar og tíðarhóskandi Føroyar.

Næstu mánaðirnir verða teir mest avgerandi í nýggjari tíð. Fleiri nýskipanir, ið skulu flyta okkum framá, standa fyri durum. Avgerðir skulu takast um fiskivinnuna, um pensjónsskipanina og um heilsuverkið. Avgerðir, sum ikki fara at geva úrslit í morgin ella í ovurmorgin, men frammi í tíðini.

Í fyrsta lagi hevur samgongan sett sær fyri at broyta fiskivinnuna. Endamálið er, at fiskivinnan skal kasta mest møguligt av sær til alt samfelagið. Fyrst og fremst til reiðarar, manningar, virki og tænastuveitarar, men eisini til allar føroyingar.

Partur av flotanum hevur leingi verið skuldarbundin, gamal og niðurslitin, tí fíggjarligar umstøður hava ikki verið til endurnýggjan. Fleiri dømi hava verið um, at fiskirættindi, sum landið hevur latið ókeypis, eru seld á privata marknaðinum. Hetta hevur við sær, at tey, sum vilja í vinnuna, mugu byrja við ovurstórari skuld.

Fiskirættindi skulu ikki longur seljast privat. Ístaðin skal tað almenna bjóða rættindi út fyri eitt hóskandi tíðarskeið. Allir føroyingar skulu hava javnbjóðis møguleika at virka í vinnuni. Vit vilja tryggja, at rættindini verða verandi á føroyskum hondum, og vit fara at krevja, at sáttmálarnir við manningarfeløgini verða hildnir. Vit skulu umsita allar fiskastovnar burðardygt, og vit vilja tryggja livandi tilfeingið sum ogn Føroya fólks. Vit vilja raðfesta fiskvinnugransking. Endamálið er at meirvirka og virðisøkja alt fiskatilfeingið mest møguligt.

Royndaruppboðssølan seinastu vikurnar hevur givið okkum eina virðismikla vitan, nú fiskivinnunýskipanin endaliga skal snikkast til. Vit kunnu seta spurning við, um kappingin virkaði nóg væl. Samstundis kunnu vit staðfesta, at inntøkurnar seinastu vikurnar kunnu rinda fyri umleið tað, sum Smyril kostar árliga. Ella tað, sum bæði tyrlutilbúgvingin og -tænastan kostar árliga. Ella stóran part av tí, sum vit brúka til at viðgera føroyskar krabbameinssjúklingar árliga.

Soleiðis kann virðið á tilfeinginum – ogn Føroya fólks – koma øllum Føroya fólki til góðar.

Í øðrum lagi skulu vit koma á mál við pensjónsnýskipanini. Hagtøl frá 2014 vísa, at alsamt fleiri fólkapensjónistar liva í fátækraváða. Málið við pensjónsnýskipanini er at lyfta allar pensjónistar úr hesari støðu. Nøkur stig eru tikin – til dømis fingu pensjónistarnir ein lítlan lætta fyri einum ári síðan og aftur á nýggjárinum. Nýggja pensjónsskipanin skal vera búskaparliga haldfør og leggja uppfyri, at fleiri gerast eldri. Tí hyggja vit nú at pensjónsaldrinum, mótrokningini og uppsparingini, og javnvágin skal finnast. Skipanin skal eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur, hava tey hug og møguleika til tað. Samstundis skal skipanin tryggja teimum, ið eru niðurslitin fyri pensjónsaldur, møguleikan at fara av arbeiðsmarknaðinum.

Í triðja lagi mugu vit taka avgerðir um sjúkrahúsverkið. Menningarætlanin fyri sjúkrahúsverkið varð løgd fram fyri nøkrum vikum síðani. Nú mugu avgerðir takast. Avgerðir um, hvørjar grundleggjandi viðgerðir og tænastur skulu vera, og hvussu vit skipa tær millum sjúkrahúsini. Avgerðir um, hvussu vit útvega og menna læknar og onnur heilsustarvsfólk, so vit hava neyðugt rásarúm til at veita heilsutænastur á hægsta stigi. Og avgerðir um, hvønn leiðslubygnað, vit skulu hava. Tað eru longu settar 5 milliónir av til hetta endamálið. Tíðliga í heyst verður aðalorðaskifti um sjúkrahúsverkið.

**Harra formaður**

»Hendir nakað í Føroyum? Rørir seg nakað har heima?« Soleiðis spurdi Jákup av Norðskála fyri nøkrum árum síðani. Hann hevði tá starvast sum kokkur bæði í Keypmannahavn og Stockholm.

Og svarið, hann fekk, var greitt: Jú, her rørir seg óvanliga nógv – og her manglar fólk. Jákup flutti heim og er nú við til at menna føroyska køkin. Hann nýtir fyrstafloks føroyska rávøru, og hann staðfestir, at føroyska vinnan er í blóma.

Jákup er komin heim at byggja land. Okkara land. Og í løtuni er tað ein glógvandi virkishugur, ið eyðkennir okkara land. Vinnulívið eigur sín avgerandi lut í góðu gongdini. Dugnaligir alarar framleiða hægstu góðsku, og alilaksur er nú okkara størsta, einstaka útflutningsvøra. Alivinnan torir eisini at bjóða framtíðini av. »Nógv rørir seg«, sum kokkurin Jákup av Norðskála fekk at vita. Til dømis verða fleiri stórar og spennandi íløgur gjørdar. Tær skulu tryggja, at føroyski laksurin verður verandi heimsins besti. Og enn fleiri fara vónandi at sleppa at eta okkara dygdargóða laks, tí vit stremba eftir at økja framleiðsluna við bæði at ala á landi og longur úti til havs.

Samstundis raðfesta vit lívfrøðiliga haldførið. Fyri at fáa betri tamarhald á lúsatrupulleikanum, hevur landsstýrið hert ásetingarnar í lúsakunngerðini.

Men »tað hendir eisini nakað« í øðrum vinnum. Uppisjóvarvinnan fyrireikar seg til framtíðina við fleiri spennandi íløgum, sum hava til endamáls at góðska okkara ríka tilfeingi uppaftur meiri. Stóru íløgurnar eru við til at tryggja arbeiðspláss, ið eru fortreytin fyri trivnaði og fólkavøkstri.

Eisini ferðavinnan er í stórari menning. Hon stendur nú fyri 9 prosentum av okkara útflutningsvirði. Fyri at halda fast í vøkstrinum orða vit nú eina heildarætlan fyri ferðavinnuna. Í henni verður dentur lagdur á at menna innlendisferðavinnuna, samstundis sum atlit verða tikin at náttúruvernd. Málið er at bjóða ferðafólkunum fleiri og meira fjøltáttað tilboð, eitt nú innan mentan og matvinnu, har føroyski køkurin er ein natúrligur partur.

Vit marknaðarføra okkum við, at landið er ódálkað, ónortið, ótrúligt. Men skulu hesar lýsingarnar kunna nýtast í framtíðini, mugu vit ansa eftir umhvørvinum. Grøna kósin er eitt úrslit av einum skilagóðum samstarvi millum landsins myndugleikar og SEV. Samgongan hevur sett sær sama mál sum SEV, at í 2030 skal øll elorka á landi stava frá varandi orku.

Men vit hava ikki bara náttúrunnar tilfeingi. Stór menning er innan KT og talgilding, og á ávísum økjum eru vit við í oddinum. Vit kunnu ganga undan við talgildum tænastum, men tað krevur eina stórhugsaða ætlan. Tí hevur landsstýrið tikið stig til »Talgildu Føroyar«, ið er ein 5-ára menningarætlan, sum skal lætta um hjá fólki, vinnu og samfelagi – og lata upp fyri nýggjum og betri tænastum.

**Harra formaður**

»Tað tók sína tíð, áðrenn eg fann mína hill – og eg trúði ikki, at eg fór at finna hana í Føroyum. Men tað havi eg avgjørt gjørt.« Soleiðis sigur Ása úr Hósvík, sum las uttanlands, men sum kom heim at umhugsa sína støðu, tá ið hon varð vorðin við barn. Hon tosaði við tey á Fróðskaparsetrinum, og ein loysn varð funnin beinanvegin. Ása er nú undir hægri útbúgving í Føroyum. Dóttirin veksur upp her heima. Tær eru báðar við til at byggja land. Okkara land.

At Ása og dóttirin vórðu verandi, er eitt dømi um, at miðvísa arbeiðið fyri at fáa fólk at støðast nú ber ávøkst.

Tær eru eitt dømi um, at tað loysti seg at seta fleiri pengar av til útbúgving og til at bøta um umstøðurnar, so at ungdómur, barnafamiljur og einsamallir uppihaldarar skulu trívast.

Men hóast nøkur viðurskifti eru batnað, er tað ikki nóg mikið. Føroyar eru á broytingarkós. Tað sæst til dømis við, at vit hava longt barnsburðarfarloyvið við seks vikum, so tað nú er 44 vikur – og samgongan ætlar at leingja tað til 52 vikur. Vit byggja fleiri leigu- og lestrarbústaðir fyri at nøkta stóra tørvin. Lág- og miðalløntt hava fingið ein skattalætta, og fíggjarliga sperdar familjur hava fingið styrk. Vit hava eisini umskipað kringvarpsgjaldið, so tað er vorðið bíligari hjá teimum, sum hava minst um hendi.

Men vit gevast ikki her. Landsstýrið hevur latið Løgtinginum uppskot um at hækka árliga barnafrádráttin við 2.700 krónum fyri børn undir skúlaaldur. Samstundis hava vit latið Løgtinginum eitt annað uppskot, sum ger tað lættari at vera undir hægri lesnaði. Uppskotið leggur upp til at hækka lestrarstuðulin við 500 krónum um mánaðin, hækka barnastudningin upp í 1000 krónur um mánaðin og geva einsamallum forsyrgjarum lestrarstuðul alt árið.

Skulu fleiri ung, sum Ása, støðast í Føroyum, mugu vit syrgja fyri, at samfelagið er tíðarhóskandi. Her er ein virkin javnstøðupolitikkur avgerandi. Og fyri fyrstu ferð nakrantíð er javnstøða í landsstýrinum – fýra kvinnur og fýra menn. Javnstøða snýr seg um frælsi og ábyrgd hjá bæði kvinnum og monnum. Um rættin til at vera á arbeiðsmarknaðinum og at vera um húskið. At vit politiskt syrgja fyri, at hvør einstakur kann skipa sær lívið soleiðis, sum hann ella hon ynskir tað. Aðalorðaskifti verður um javnstøðumál hesa tingsetuna.

Ein onnur fortreyt fyri at gera samfelagið meiri tíðarhóskandi er eitt gott samferðslukervi. Tað skal bera til at búgva á einum staði og arbeiða aðrastaðni í landinum. Stytta vit teinarnar, økja vit møguleikarnar. Vit arbeiða eisini við at gera eina meira samhaldsfasta loysn fyri samferðsluøkið.

»Eg væntaði ikki at finna mína hill her, men tað havi eg avgjørt gjørt«, segði Ása. Og vit mugu støðugt arbeiða fyri, at øll kunnu finna júst sína hill her heima.

Tí eitt samfelag, sum hóskar til tíðina, má rúma øllum sínum íbúgvum.

Orðaskiftið um hjúnabandslógina var stundum hvast, stundum kensluligt og stundum harðligt. Men soleiðis er tað onkuntíð í einum fólkaræði. Øll sjónarmið verða borin fram, og síðani røkka vit einum úrsliti. Úrslitið umboðar sjáldan øll sjónarmið. Men tey, sum enda í minniluta í einum máli, eru kanska í meiriluta í einum øðrum. Við at samtykkja broytingina, haldi eg, at vit fluttu okkum ímóti einum rúmligari samfelag, sum virðir og javnsetur allar borgarar.

Í okkara landi búgva eisini 1.300 fólk við øðrum upphavi enn føroyskum, og talið veksur alsamt. Nýggju føroyingarnir eru ein týðandi styrkur. Eisini tey mugu fáa sína hill. Vit leggja nógv fyri at fáa tey integrerað í okkara samfelag og at trívast her. Tí seta vit í næstum eina integrasjónsætlan í verk.

Eitt tíðarhóskandi samfelag fevnir eisini um sínar borgarar við serligum avbjóðingum. Seinnu árini eru fleiri bú- og viðgerðarstovnar, búfelagsskapir og sambýli latin upp um landið, og vit steðga ikki her. Málið er at útvega øllum okkara borgarum hóskandi bústaðir. Í ár eru út við 20 milliónir settar av, og komandi fýra árini verða 60 milliónir afturat nýttar til at byggja stovnar og sambýli til fólk við serligum tørvi.

Vit skulu eisini hava betri og tíðarhóskandi umstøður, tá ið vit gerast sjúk. Stóra útbyggingin á Landssjúkrahúsinum er eitt megnartak. Nýggi meginbygningurin skal hýsa nýggjum psykiatriskum depli, medisinskari seingjadeild, føðideild, endurmenningareind og køki.

Tað krevur sítt at fylgja við tíðini – men tað er kortini nakað, vit eiga at krevja.

**Harra formaður**

Neyðugu útbyggingarnar, økta vælferðin og betru korini hjá lág- og miðalløntum eru ikki ókeypis. Alt kostar. Tí hava vit breiðkað inntøkugrundarlagið við nøkrum gjøldum. Samstundis rinda stóru tilfeingisvinnurnar eitt meira rímiligt gjald fyri síni framíhjárættindi.

Seinastu árini hevur stórur vøkstur verið í búskapinum, og hann tykist halda fram. Framgongdin hevur higartil bygt á stóru útflutningsvinnurnar, men nú sæst eisini framgongd í ferðavinnuni, byggivinnuni og handilsvinnuni. Hetta styrkir búskapin.

Samstundis vita vit, at eingin vøkstur stendur við. Tí er neyðugt nú í góðum tíðum at byrgja upp fyri lakari tíðum. Tað, at vit, eftir samfull átta ár við undirskoti, hava fingið avlop á fíggjarlógina, er eitt týdningarmikið stig. Málið er at hava avlop fleiri ár á rað, so vit kunnu gjalda skuldina. Tí verður neyðugt at sýna varsemi.

Tað ger samgongan. Vanliga veksur almenni raksturin í góðum tíðum við 7 til 8 prosentum árliga. Komandi ár halda vit aftur, so raksturin bara veksur við 1,8 prosenti. Skulu vit stýra búskapinum við skili, mugu land og kommunur samskipa sínar íløgur og sín rakstur meira. Tað munar lítið, um landið heldur aftur, meðan kommunurnar økja sínar íløgur. Ella at landið gjarar út, og kommunurnar halda aftur. Tí hava vit tikið stig til at skipa búskapin millum land og kommunur betur.

Eitt av høvuðsmálunum hjá samgonguni er at bøta um haldførið. Almenni búskapurin er í løtuni ikki haldførur, tá ið hugsað verður fleiri ár fram. Lata vit standa til, fara vit um nøkur ár at mangla 100-tals milliónir á fíggjarlógini. Við munagóðum átøkum ber kortini til at broyta gongdina. Komandi ár bøta vit longu um haldførið við 40-50 mió. kr.

Men eisini aðrar broytingar verða framdar. Í framtíðini verður partur av yvirskoti landskassans sett í Búskapargrunn Føroya. Grunnurin skal gerast eitt virkið amboð til at røkka einum støðugari og sterkari búskapi – til dømis til at javna sveiggini í búskapinum. Nýggi Landsbankin fer at umsita búskapargrunnin.

Føroyar eru á broytingarkós, og samgongan arbeiðir miðvíst ímóti einum sjálvberandi búskapi. Tí hava vit fryst ríkisveitingina fasta, so hon ikki hækkar á hvørjum ári, men hinvegin gerst ein minni partur av búskapinum, so hvørt sum búskapurin veksur.

Størri sjálvbjargni er eitt mál hjá samgonguni. Og fyritreytin fyri sjálvbjargni er at taka sjálvsábyrgd. Samgongan hevur tí sett ferð á arbeiðið at yvirtaka útlendingamál, loftrúmið og persóns-, familju- og arvarættin.

Men tað eru ikki bara Føroyar, sum eru á broytingarkós. Evropa stendur fyri fleiri broytingum. Við Brexit kunnu vit vænta fleiri broytingar á handils- og fiskivinnuøkinum, ið eru hornasteinarnir í okkara uttanríkispolitikki. Vit reka ein virknan uttanríkispolitikk og leggja nógv fyri at tryggja okkara áhugamál. Tí fylgir landsstýrið væl við, hvørjar avleiðingar og møguleikar Brexit hevur við sær. Vit hava longu sett okkum í samband við bretsku og skotsku stjórnina fyri at tosa um broytingarnar og møguleikarnar.

Brexit er bara eitt dømi um, hvussu skjótt heimurin broytist. Og tí er neyðugt, at vit reka miðvísan uttanríkispolitikk og sita við borðið, har avgerðir verða tiknar. Tí stremba vit eftir sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum, EFTA og WTO. Tí vilja vit endurskoða uttanríkispolitisku heimildarlógina, so

okkara virkisføri úti í heimi kann gerast betri. Og tí brúka vit størri megi til arktiska samstarvið komandi árini og uppraðfesta samstarvið í Útnorði.

**Harra formaður**

»Eg stúrdi. Men so at koma heim og bara jarða ta stúranina, tað var fantastiskt«. Soleiðis sigur Solveig, sum eftir fleiri ár uttanlands vildi royna seg og sínar førleikar í Føroyum.

Nú byggir Solveig land. Okkara land. Saman við so mongum øðrum, sum fyri fáum árum síðani als ikki tordu at droyma um eina tilveru í Føroyum. Sum listfrøðingur hevur hon ein týdningarmiklan leiklut í okkara spírandi mentanarlívi.

Tað er eitt aðalmál hjá samgonguni, at okkara listafólk skulu hava betri møguleikar at hugsavna seg um sína list. Tí hevur samgongan hækkað listastuðulin, bæði til Mentanargrunnin og til film. Og tí er nú fyri fyrstu ferð orðaður ein politikkur fyri skapandi vinnur, ið fevnir um film, telduspøl, tónleik, bókmentir, sniðgávu, arkitektur og matgerð.

Mentanin knýtir okkum saman og ger okkum til eitt fólk – eina tjóð. Mentanin er ein høvuðsorsøk til, at vit búgva her og ikki aðrastaðni, og hon er sterkasta megin, ið heldur okkum saman, hóast vit eru ósamd. Vit skulu tí stremba eftir at skapa rúm. Rúm fyri teimum tonkum, hugskotum, meiningum og lívsáskoðanum, sum eru grundarlagið undir okkara samfelagi, okkara mentan, okkara samleika.

Við ætlaðu stjórnarskipanini verður okkara samleiki niðurfeldur, og hetta samleikaskjalið tryggjar okkum grundleggjandi rættindi og skyldur. Vit staðfesta, at Føroya fólk hevur valdið í Føroyum. Stjórnarskipanin er ein felags grundvøllur, sum byggir á okkara felags siðir, søgu og mentan. Vit tryggja til dømis rættin at fara á flot og at ganga í haga. Vit tryggja grundleggjandi rættindi og frælsi hjá tí einstaka. Vit tryggja rætt til útbúgving fyri øll, pensjón og sosiala trygd. Vit tryggja felags tilfeingið sum fólksins ogn. Hesi rættindi taka vit fyri givið – men tey eru eingin sjálvfylgja. Hyggið bara, hvussu onnur lond hava skert frælsið.

Stjórnarskipanin tryggjar okkum eisini rættin at verða spurd eftir á fólkaatkvøðu, um grundleggjandi broytingar skulu gerast í okkara ríkisrættarligu støðu. Og á heysti 2017 skulu vit á fólkaatkvøðu, tá ið stjórnarskipanin – okkara samleikaskjal – skal standa sína roynd.

**Harra formaður**

Exit Føroyar. Hetta hugtakið var partur av okkara veruleika fyri fáum árum síðan. Hugtakið er í dag um at hvørva. Føroyingar leita ikki í eins stóran mun av landinum, og fólk sum Brynhild, Ása, Sámal, Jákup og Solveig flyta aftur til Føroya. Tíbetur. Tey koma heim at byggja land saman við okkum, sum longu búgva her.

Men nú mugu vit tora at gera neyðugu broytingarnar fyri at varðveita gongdina. Skulu vit tryggja, at Føroyar verða eitt enn betri land at liva í hjá okkum øllum, verður neyðugt at halda á at arbeiða í felag.

Vit umboða ymisk áhugamál. Ymisk sjónarmið. Ymisk øki. Tað er ein styrki. Latið okkum nú í felag finna felagsstevið. Latið okkum finna tað fram, sum sameinir okkum, og ikki leggja dentin á tað, sum skilir okkum.

Latið okkum seta Føroyar og føroyingin fremst – ikki taktikk og prestisju.

Vit fara í dag undir nýggja tingsetu. Latið okkum nú saman byggja framtíðina í Føroyum. Latið okkum tryggja eitt samfelag, har ið vit taka hond hvør um annan. Eitt samfelag, sum ikki letur nakran detta niðurímillum. Eitt samfelag, har rúm er fyri okkum øllum.

Eg fari at enda við eini yrking eftir Sissal Kampmann – ein av okkara dugnaligu og virðisløntu yrkjarum, sum eisini er flutt heim aftur at byggja land. Okkara land.

*At standa*
*við einari heilari oyggj undir fótunum*
*við einum heilum landi streymandi*
*upp gjøgnum beinini, kynsgøgnini,*
*innvølirnar, ryggjargeislarnar, hálsin,*
*andlitið, heilan, blóðrenslið, kyknurnar.*
*at standa og vita við vissu*
*at tað er úr hesum*
*tú er sprottin*
*vaksin inn í tilveruna*
*tumma fyri tumma*
*til vøksturin steðgaði*
*áðrenn ella eftir tú vildi tað.*

Eg ynski øllum góða ólavsøku.

Gud signi Føroyar!

GG: Útsagnirnar hjá teimum fimm persónunum, ið verða endurgivnir í røðuni, stava frá einum tiltaki í juni 2016 fyri útisetum á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn. Útsagnirnar kunnu síggjast og hoyrast á Youtube.

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNAR- OG LÓGAMÁL

### Stjórnarskipan

Eitt av høvuðsmálunum hjá samgonguni er at geva fólkinum høvi at samtykkja egnu stjórnarskipan á fólkaatkvøðu. Nýggja stjórnarskipanin skal vera okkara samleikaskjal, har sjálvsavgerðarrættur Føroya fólks verður staðfestur. Harafturat skal stjórnarskipanin áseta okkara fólkaræðisliga stýrislag og grundleggjandi rættindi og skyldur borgaranna.

Løgmaður hevur boðið øllum formonnunum í politisku flokkunum á tingi við í arbeiðið. Málið er at fáa í lag eina breiða semju um hetta stórmál. Uppskot verður lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu, og eftir ætlan verður fólkaatkvøða um nýggju stjórnarskipanina á heysti 2017.

### Mál á føroyskar hendur

*Persóns-, húsfólka- og arvarættur*

Sum liður í at gerast meira sjálvbjargin verður málsøkið, persóns-, familju- og arvarættur tikið á føroyskar hendur í hesum valskeiðinum.

Samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar um yvirtøkuna fara fram á embætisstigi í løtuni. Arbeiðið verður leitt av Heilsu- og innlendismálaráðnum, gongur eftir ætlan, og miðað verður eftir, at samráðingarnar verða lidnar fyrst í 2017. Málsøkið verður væntandi yvirtikið í seinasta lagi á ólavsøku 2018. Tá ið málsøkið verður yvirtikið, fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið og útinnandi valdið á økinum. Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið, og við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarættur.

*Útlendingamál*

Beint eftir valið varð sjøtul aftur settur á arbeiðið at yvirtaka útlendingamál. Felags yvirlýsing varð undirskrivað millum uttanríkis- og vinnumálaráðharran og danska integrasjónsráðharran í oktober 2015, har partarnir samdust um at raðfesta uppgávuna og at seta neyðuga starvsfólkatilfeingið til at fremja yvirtøkuna í verki.

Fyrireikingararbeiðið er komið væl áleiðis, og vónirnar at fáa eina semju um marknaðeftirlitið við Schengen, sum áður hevur víst seg at vera ein avbjóðing, eru góðar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið saman við Útlendingastovuni og danska embætisverkinum er í løtuni í ferð við at gera neyðugu útgreiningarnar, soleiðis at endaliga avgerðargrundarlagið undir yvirtøkuni verður klárt. Ætlanin er, at málið skal verða klárt at leggja fyri Løgtingið í vetur.

*Loftferðsluøkið*

Farið er undir eina miðvísa tilgongd at fáa loftrúmið á føroyskar hendur. Í løtuni arbeiðir Uttanríkis- og vinnumálaráðið við at leggja endaliga leistin fyri yvirtøkutilgongdina. Síðan verður farið undir miðvísa førleikamenning soleiðis, at føroyskir myndugleikar eru førir fyri at røkja uppgávuna.

**Kunngerðir um skráseting av vápnum, vápnaprógv og trygd og goymslu av vápnum**
Í mai 2015 samtykti Løgtingið at broyta vápnalógina soleiðis, at ymisk trygdarátøk vórðu sett inn í lógina, m.a skráseting av vápnum og vápnaprógv. Neyðugu kunngerðirnar, sum skulu skipa og fremja lógarbroytingarnar, verða nú gjørdar. Umhvørvisstovan fer at sita fyri eini vápnaskrá og fyrisita vápnaprógv. Kunngerð um skráseting av vápnum er sett í gildi, og væntandi verður kunngerð um vápnaprógv lýst í august ella september. Eisini verða reglur ásettar um trygd og goymslu av vápnum. Arbeitt verður við at fáa gjørt undirvísingartilfar til vápnatrygdarskeiðini og at skipa fyri góðkenning av undirvísarum í vápnatrygdarskeiðum. Miðað verður eftir at fyrstu vápnatrygdarskeiðini verða boðin út í heyst.
Í vápnalógini var eisini ásett, at persónar, ið eiga ella liggja inni við ólógligum vápnum ella lutum, kundu til og við 30. juni 2016 lata tey inn til Føroya landfúta uttan revsitiltøk. Tá ið freistin var úti, vóru á leið 160 ólóglig skotvápn latin løgregluni.

**Broyting í revsilógini um kynslig brotsverk**
Í ískoytinum til samgonguskjalið stendur m.a., at landsstýrið hevur sett sær fyri at broyta reglurnar um neyðtøku í revsilógini. Uppskot um at broyta reglurnar um kynslig brotsverk í kap. 24 í revsilógini verður lagt fyri Løgtingið í heyst soleiðis, at tær verða nútíðargjørdar og dagførdar. M.a. verður neyðtøka víðkað til eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil, misnýtslu av persóni í hjálparleysum tilstandi ella støðu og samlegu við børn undir 12 ár. Ásetingin um ólógligan tvingsil, misnýtslu av sálarsjúkum og onnur grov misnýtsla verður víðkað til eisini at fevna um brot framt í hjúnalagi. Fyrningarfreistin verður longd fyri ávís brotsverk, og ættleiðing og lívfrøðiligur skyldskapur verða javnsett við blóðskemd.

**Nýggj løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing**
Í ískoytinum til samgonguskjalið stendur eisini, at landsstýrið hevur sett sær fyri at leggja lóg um sonevnda stalking fyri Løgtingið. Løgmaður ætlar at leggja uppskot um nýggja tilhaldslóg fyri Løgtingið í heyst, sum eisini hevur reglur um tráfylging (stalking). Við hesum lógaruppskotinum verða reglurnar um tilhald greiðari og beinleiðis ásettar í lógini. Eisini verður heimilað at geva landafrøðiliga avmarkað uppihaldsforboð umframt at vísa einum harðligum persóni burtur úr heiminum í upp til 4 vikur. Tráfylging (stalking) verður allýst í lógini, og tráfylging verður mett sum herðandi umstøða, um brot verður framt á lógina.

**Dagføring av passlógini**
Passlógin, sum er galdandi í Føroyum, hevur ikki verið dagførd í fleiri ár. Gjørdar eru seks lógarbroytingar í Danmark í tíðarskeiðnum 1999 til 2013, sum ikki eru settar í gildi fyri Føroyar. Passið er eitt týðandi skjal fyri at kunnu vátta sín samleika, og tí eigur henda lóggáva at verða dagførd regluliga, so at vit ikki koma í ta støðu, at spurningar kunnu verða settir við okkara pass. Uppskot um dagføring av passlógini í Føroyum verður lagt fyri Løgtingið í heyst. Við uppskotinum verður heimild givin at áseta, at umsókn um pass verður send gjøgnum talgilda skipan. Umframt vanliga gjaldið fyri pass skal eisini serstakt gjald latast fyri at fáa talgild fingraprent í passið. Gjaldið fyri pass til vaksin og fyri pensjónistar, sum hava fylt 67 ár, verður dagført.

**Dagføring av lóggávu sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum**
Tørvur er at dagføra lóggávuna, sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum og av føroyskum málum. Løgmaður ætlar at leggja tvey ríkislógartilmæli um tað fyri Løgtingið í komandi tingsetu. Við fyrra ríkislógartilmælinum verður Offentlighedsloven sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av føroyskum málum – bæði í Føroyum og í Danmark. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um alment innlit framvegis galdandi. Við tí seinna ríkislógartilmælinum verður Lov om behandling af personoplysninger sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av persónsupplýsingum í Føroyum. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um persónsupplýsingar framvegis galdandi. Dagføring av persónsupplýsingarlógini fyri ríkismyndugleikarnar er m.a. ein fyritreyt fyri møguleikan at seta krav um barnaváttan í Føroyum.

## FISKIVINNU- OG LANDBÚNAÐARMÁL

Á nýggjárinum verða 40 ár liðin síðani føroyska fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar. Tá fingu vit ræðið á einum sjóøki, ið er 275.000 ferkilometrar til støddar. Í hesum sjógvi í miðjum Norðuratlantshavi er grundarlag fyri einum livandi og endurnýggjandi tilfeingi, ið fyri hvønn íbúgva er mest í heiminum. Vit eru uttan iva millum heimsins ríkastu tjóðir, tá ið um livandi náttúrutilfeingi ræður.
Við hesum hvílir ein ómetaliga stór ábyrgd á okkum. Vit skulu umsita hetta ríkidømið burðardygt sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum og vælferðini hjá fólkinum. Og vit skulu fáa sum mest gagn og virði burtur úr hvørjum einasta kilo og grammi, ið vit heysta úr havsins livandi skapan. Ikki bert til frama fyri okkum, ið nú liva, men fyri øll komandi ættarlið her í Føroyum.
Vit hava ikki megnað hetta nóg væl hesi seinastu 40 árini. Men vit hava eitt søguligt høvi at gera nakað við tað nú, vit læra av okkara mistøkum og av tí, sum hevur eydnast. Frá 1. januar 2018 kunnu vit seta í verk eina nýggja og varandi skipan fyri fiskivinnuna í Føroyum.

**Fiskivinnunýskipan**
Landsstýrið hevur sett sær hetta sum eitt høvuðsmál og hevur sett setningin greiðan fyri eina nýggja skipan, ið skal vera undir rættartryggum og haldførum lógarkørmum og fyrisiting og skipanum:

- Føroyar skulu gerast undangonguland at umsita allar fiskastovnar burðardygt og at hava fremstu vitan og gransking um fiskastovnar og vistfrøðiligu skipanirnar í havinum.
- Livandi tilfeingið skal tryggjast sum ogn hjá Føroya fólki, og rættindini at troyta tað skulu vera á føroyskum hondum.
- Farast skal frá privatari sølu av loyvum og fiskirættindum til eina marknaðargrundaða skipan, har tað almenna bjóðar rættindi út fyri hóskandi tíðarskeið.
- Grundarlag skal vera fyri at skapa mest møguligan virðisvøkstur og avkast í Føroyum av fiskatilfeinginum til reiðarí, manningar, virki, fyritøkur, starvsfólk, tænastuveitarar og samfelagið alt. Og vit skulu støðugt menna nýskapan og føroyskar førleikar í øllum pørtum av virðisskapanini.
- Vinnumøguleikar skulu ikki savnast á fáum hondum, men somu rættindi skulu vera at bjóða seg fram at reka vinnu og skapa fjølbroytt virksemi, nýskapan og menning kring landið.

– Føroyar skulu støðugt menna sín leiklut og sína ábyrgd í altjóða samstarvi og tryggja sín rættvísa part av rættindunum til felags og ferðandi fiskastovnar, umframt at samráða seg til skilagóðar avtalur við onnur lond um møguleikar og atgongd at fiska hvør hjá øðrum.

Nevndin, ið varð sett at gera ítøkiligt uppskot til nýggja skipan og til skiftisskipanir, handar landsstýrismanninum álit og tilmæli í august. Síðani verður beinanvegin farið undir politiskar samráðingar við allar flokkar á tingi til tess at fáa semjur um varandi skipan. Ætlandi verður komið á mál á vári í 2017, soleiðis at lógargrundarlag er samtykt, ið tekur við frá 1. januar 2018.

**Samráðingar um ferðandi fiskastovnar**

Strandalandasamráðingarnar um norðhavssild, svartkjaft og makrel halda støðugt fram við tí endamáli at fáa semjur millum øll strandalond um býti og umsiting. Føroyar eru lyklaland í øllum trimum av hesum ferðandi fiskastovnum og hava greið og undirbygd samráðingarkrøv og skjalprógv. Bretska avgerðin um at taka seg úr ES hevur skapt eina nýggja støðu í samráðingunum, tí støðan hjá ES sum strandaland og støðan hjá Bretlandi sum møguligt strandaland má greiðast. Landsstýrið hevur sett seg í samband við bretska og skotska ráðharran á økinum til tess at samskifta um støðuna.
Í 2016 hevur landsstýrið beinleiðis tikið stig í býtisavtalum við okkara grannalond, ið økja um botnfiskakvoturnar fyri heimaflotan í fremmandum sjógvi. Í komandi tíðum verður stór orka løgd í altjóða arbeiðið innan fiskivinnuøkið, soleiðis at Føroyum verða tryggjað bestu samráðingarúrslit.

**Uppboðssøla**

Í 2016 eru royndir gjørdar innan uppboðssølu av fiskirættindum. Ávísar nøgdir av uppsjóvarfiski og botnfiski eru seldar á uppboði. Endamálið við ætlanini er at royna uppboðssølu sum amboð hjá landinum at luta út fiskirættindi við, og at vita, hvussu ein uppboðssøla best kann skipast. Royndin er skipað eftir tveimum ymsum høvuðsskipanum, soleiðis at til ber at samanbera fyrimunir og vansar við hesum. Til heystar vera royndirnar eftirmettar, og støða verður tikin til spurningin um útboð av veiðirættindum í 2017.

**Áseting av fiskidøgum**

Uppskotið um áseting av fiskidøgum fyri árið 2016/17 byggir á aðalregluna í samgonguskjalinum um, at allur fiskiskapur skal vera lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggur. Endamálið er at kjølfesta eina umsitingarætlan í politisku skipanini, ið kann røkka málinum um burðardygga stovnsrøkt.

**Nýtt rannsóknarskip**

Nýggja samgongan hevur lagt herðslu á at styrkja um fiskivinnugransking og – rannsóknir.
Tí legði samgongan alt fyri eitt, eftir at hon varð skipað, játtanina til nýtt rannsóknarskip í fasta legu. Ætlandi verður tilfar búgvið at bjóða út seint í ár, soleiðis at skipið kann latast føroyingum í seinasta lagi 2019. Endamálið við nýggjum rannsóknarskipi er ikki eina at skifta eitt gamalt skip út. Týðandi er, at virksemið á Havstovuni støðugt fær høvi at mennast. Havstovan skal hava bestu treytir at skapa eitt altjóða og viðurkent granskingarumhvørvi, ið eisini dregur áhuga hjá altjóða granskarum at koma til Føroy-

ar. Havstovan er vísindaliga grundarlagið undir at umsita allar okkara egnu stovnar burðardygt og til okkara altjóða krøv um býtið av ferðandi fiskatovnum og umsiting teirra. Eitt nýtt rannsóknarskip er ein týðandi fyritreyt fyri hesum.

**Fiskivinnugransking**

Landsstýrið hevur somuleiðis tikið ítøkilig stig til menning innan økið fiskivinnugransking, fiskivinnuroyndir og virðisøking. Játtanin til fiskivinnuroyndir og fiskivinnugransking verður økt munandi í komandi ári. Harumframt er ætlanin at merkja 10% av inntøkunum frá uppboðssølu av fiskirættindum til fiskivinnugransking.

Landsstýrið kannar somuleiðis, hvussu alt økið við fiskivinnugransking og fiskivinnuroyndum kann skipast, soleiðis at best møguligt samstarv og samfígging kann fáast saman við vinnuni. Serligur dentur skal leggjast á gransking og royndir, ið hava hesi endamál:

- At størri virðisvøkstur verður skaptur í Føroyum í øllum liðum í vinnuni.
- At føroyskir førleikar verða mentir í tøkni, framleiðslu, veitingum, tænastum og sølu.
- At tilfeingið verður betri gagnnýtt og virðisøkt.
- At alt av fiskinum verður fingið til lands.
- At góðska og góðskuváttanir kunnu mennast í øllum liðum.
- At skapa marknaðaratgongd og marknaðarføring við hægri virði.

**Fiskiveiðieftirlitið**

Fiskiveiðieftirlitið verður styrkt. Miðað verður eftir hægri játtan, og skipan við talgildum dagbókum verður tikin í nýtslu í næstum. Avgreiðsluparturin av øllum fiski- og veiðiloyvum verður lagt út úr aðalráðnum til undirliggjandi stovn, og talgilda fiskiloyvisskipanin verður víðkað til eisini at fevna um veiðiloyvi.

**Grindamálið**

Í grindamálinum er aðalmálið hjá landsstýrinum greitt: alt livandi tilfeingi í havinum skal gagnnýtast innan burðardyggar karmar. Landsstýrið dagførir støðugt reglur innan økið, sum allar byggja á regluna um, at tilfeingið skal gagnnýtast, samstundis sum gagnnýtslan er framd á best skipaðan hátt. Broytingar í grindalógini og onnur átøk við m.ø. trygd á sjónum, hava bøtt munandi um tilbúgvingina í sambandi við átøk og virksemið hjá felagsskapum, ið vilja gera seg inn á grindarakstur og grindadráp í Føroyum.

**Landbúnaður**

Í vár hevur landsstýrið sett sjøtul á arbeiðið at seta greið mál fyri landbúnaðin. Mál verður sett fyri, hvussu vit í størri mun vera sjálvberandi við staðbundnum dygdarvørum. Økið innan gransking, útbúgving og royndir verður dagført. Ein lendisætlan skal greinast, og ein lýsing av serstøkum góðum landbúnaðarlendi gerast. Ætlanin skal rudda slóð fyri betri gagnnýtslu av lendinum og størri fóðurframleiðslu.

Búnaðarstovan hevur í vár tikið stig til at gera eina frágreiðing í norðurlendskum høpi, ið lýsir og nágreinar kappingarstøðuna hjá landbúnaðarvørum mótvegis innfluttum vørum. Tilfarið frá hesi kanning skal vera grundarlag undir arbeiðinum viðvíkjandi sjálvberandi føroyskum dygdarvørum.

Á sumri í 2016 hevur Búnaðarstovan tikið stig til munandi ábøtur viðvíkjandi móttøku og hagreiðing av ull.

**Tilbúgving**
Á tilbúgvingarøkinum verða dagføringar gjørdar innan útgerðina á vaktarskipunum, eins og innan samskiftisøkið hjá týðandi tilbúgvingareindum. Landsstýrið fer at kanna í næstum, hvørt tað er fyrimunur at leggja røktina og dagføringina av samskiftisútgerðini innan tilbúgvingarøkið til teir stóru veitararnar á teleøkinum, heldur enn at stovnar hjá landinum, við avmarkaðari fíggjarorku, umsita henda partin.

Landsstýrið ætlar at styrkja um veðurtænastuna og veðurstøðirnar kring landið.

Landsstýrið leggur áherðslu á at vera góður stuðul hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum. Í hesum sambandi skal vera nevnt, at tað var av stórum týdningi, at tryggingarviðurskiftini hjá feløgunum vórðu avgreidd í vár, soleiðis at bjargingarfeløgini aftur gjørdust virkin.

Skipanin viðvíkjandi oljutilbúgving á sjónum verður eftirmett og dagførd. Størri fíggjarlig játtan skal fáast til vega, soleiðis at útgerð til oljubasing verður tøk í størri mun enn í dag.

Umboð fyri tilbúgvingina hava á vári í 2016 latið eina dagførda frágreiðing av tilbúgvingini úr hendi, sum lýsir, hvussu skipanin av tilbúgvingini í Føroyum er uppbygd. Henda lýsing, eins og tilbúgvingarlógin, ið hevur nøkur ár á baki, verða grundarlag undir eini frágreiðing um, hvørt tilbúgvingarlógin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar skulu gerast í lógini.

## FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

Mál samgongunnar er at fremja einar sjálvbjargnar, samhaldsfastar og tíðarhóskandi Føroyar fyri alt fólkið. Týðandi fyritreyt fyri at røkka hesum eru átøk, ið gera føroyska búskapin fíggjarliga haldføran og sjálvbjargnan. Fylgjandi høvuðsmál verða tí raðfest í Fíggjarmálaráðnum næsta árið.

**Fíggjarlógin fyri 2017**
Fíggjarlógin leggur fíggjarligu karmarnar um alt virksemi landsins. Henda lóg er tí eitt av týdningarmestu amboðum landsstýrisins til at fremja førda politikkin. Miðað verður eftir, at úrslitið á fíggjarlógini fyri 2017 verður 50 mió. kr. í avlopi. Í fíggjarlógini verða fleiri øki raðfest fyri at røkka politisku málum landsstýrisins, so sum virðisøking innan fiskivinnu, játtan til fleiri serlæknar, hækkaður lestrarstuðul, fleiri útbúgvingar, heimtøka av útlendingamálum, fólkaatkvøða um stjórnarskipan, bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum, samferðsluútbyggingar v.m.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum skal fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja fíggjarlógaruppskot fyri næsta árið fyri Løgtingið. Løgtingið hevur síðan 3 mánaðir at viðgera og at gera broytingar í uppskotinum, sum skal vera samtykt í seinasta lagi 31. desember sama ár.

**Játtanarkarmar fyri árini 2018-2022**

Játtanarkarmarnir leggja yvirskipaðu fíggjarpolitisku karmarnar fyri landið og politikk samgongunnar. Innan hesar játtanarkarmarnar, ið fevna um umleið 5 mia. kr. á útreiðslusíðuni og tað sama á inntøkusíðuni, verður politikkur samgongunnar framdur. Fíggjarlógir landsins skulu í høvuðsheitum fremjast innan fyri samtyktu játtanarkarmarnar. Í vár samtyki Løgtingið játtanarkarmar fyri 2017-2021, og fíggjarlógin fyri 2017 verður smíðað innan samtykta játtanarkarmin.

**Landsbanki Føroya og Føroya váðaráð fyribyrgja fíggjarkreppur og styrkja búskapin**

Nýggi Landsbanki Føroya og Føroya váðaráð verða stovnsett og skulu í felag virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Føroyar eru raktar av fleiri fíggjar- og búskaparkreppum seinastu áratíggjuni. Tær hava kostað samfelagnum, fólkinum og vinnuni nógv, bæði tá ið ræður um fíggjarlig virði, trivnað, sjálvbjargni og fólkatal. Fleiri stig verða nú tikin at fyribyrgja, at søgan endurtekur seg. Landsbanki Føroya verður settur á stovn saman við Føroya váðaráði við endamálinum at virka fyri fíggjarligum støðufesti og at virka fyri at fyribyrgja framtíðar fíggjarkreppum, minka sveiggini í føroyska búskapinum og harvið styrkja búskapin.
Nýggi Landsbanki Føroya skal virka sum óheftur, almennur fíggjar- og greiningarstovnur og fer at virka sum skrivstova hjá Føroya váðaráði.

**Búskapargrunnur Føroya gerast virkið búskaparamboð**

Búskapargrunnur Føroya skal nú gerast virkið amboð at røkka einum meira støðugum, sterkum og sjálvbjargnum búskapi, ið hevur fyrilit fyri bæði núlivandi og komandi ættarliðum.
Partur av avlopi landskassans verður frameftir settur í Búskapargrunnin. 20% av avlopi landskassans upp til 200 mió. kr. og 50% av avlopi landskassans oman fyri 200 mió. kr. Nýggi Landsbanki Føroya fer at umsita Búskapargrunn Føroya vegna landið. Búskapargrunnurin skal nýtast sum amboð at gera føroyska búskapin sjálvbjargnan og at javna sveiggini í búskapinum. Lógaruppskot hesum viðvíkjandi verða løgd fyri Løgtingið í tingsetuni.

**Skattanevndin og skattanýskipan**

Føroyska skatta- og avgjaldsskipanin skal stuðla undir fólkavøkstur, sjálvbjargni og framgongd í Føroyum. Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur tí sett nevnd at endurskoða verandi skipan og koma við tilmælum til eina skattanýskipan, ið eitt nú skal tryggja fíggjarliga haldført inntøkugrundarlag hjá landi og kommunum. Skattanýskipanin skal eisini fremja eitt javnari býti av landsins virðum millum borgarar landsins og eggja fólki og vinnu at "velja" Føroyar. Hartil skal skattanýskipanin styrkja kappingarførið hjá vinnulívinum og stuðla undir umhvørvisvinarliga og burðardygga atferð hjá vinnu og borgarum. Fleiri fylgibólkar verða knýttir at skattanevndini; eitt nú verða fylgibólkar fyri kommunur, fakfeløg, vinnulív, løgfrøðiliga skattaserfrøði, og eisini verður politiskur fylgibólkur knýttur at nevndini.
Fíggjarmálaráðið røkir skrivarauppgávuna hjá skattanevndini. Skattanevndin verður liðug við sítt arbeiði 1. juni 2017.

**Talgildu Føroyar – undangonguland innan talgilding**

Føroyar skulu gerast undangonguland innan talgilding. Stór menning fer støðugt fram innan KT og talgilding, og um samfelagið ikki støðugt mennir seg á hesum økjum, er skjótt at gerast eftirbátur. Føroyar eru longu í fremstu røð á summum økjum. Eitt nú kunnu nevnast Talgilda Heilsuskipanin og Búskaparskipan Landsins. Í Føroyum er talgildingin tó í mestan mun farin fram á tann hátt, at einstøku stovnarnir hvør í sínum lagi hava ment sítt talgilda virksemi, heldur enn eftir eini yvirskipaðari ætlan og kós til frama fyri alt tað føroyska samfelagið.

Føroyar hava møguleikan at gerast undangonguland innan talgilding av tænastum, um røttu fyritreytirnar eru til staðar. Landsstýrið hevur tí tikið stig til verkætlanina Talgildu Føroyar, ið er ein 5-ára menningarætlan fyri at skapa eitt talgilt undirstøðukervi í Føroyum og at talgilda almennar tænastur. Millum málini í verkætlanini er málið at menna føroyska talgilda undirskrift til allar føroyingar og føroyskar fyritøkur, stovnar v.m. Tá ið komið er á mál, skulu føroyingar kunna røkka øllum almennum og privatum talgildum tænastum umvegis egnan borgaraportal. Hetta fer at lætta um hjá fólki, vinnu og samfelagnum og lata upp fyri nýggjum og betri tænastum.

Talgildu Føroyar verkætlanin er skipað undir verandi KT-eind hjá landinum, KT Landsins, ið er partur av Gjaldstovu Føroya.

**Lættari hjá smábarnafamiljum - hækkaðan barnafrádrátt fyri børn undir skúlaaldur**

Fyri at stuðla upp undir størri fólkavøkstur og fyri at lætta fíggjarliga um hjá smábarnafamiljum hækkar landið barnafrádráttin fyri børn millum 0 og 6 ár við 2.700 kr. Barnafrádrátturin fyri børn undir skúlaaldur fer tí frá 1. januar 2017 úr 6.500 upp í 9.200 kr. árliga. 12 mió. kr. eru settar av í játtanarkarminum fyri 2017 til endamálið.

**Búskaparstýring og samskipan millum land og kommunur**

Fíggjarmálaráðið hevur tikið stig til at fremja betri búskaparstýring og samskipan millum land og kommunur. Orsøkin er, at land og kommunur eru týðandi partar av føroyska búskapinum. Tí ber ikki til at fremja veruliga búskaparstýring, um partarnir ikki samstarva tætt. Fyrsti fundurin hevur verið við Kommunufelagið um møguligar loysnir hesum viðvíkjandi. Í øðrum londum verður fíggjarpolitikkurin hjá landi og kommunum samskipaður við avtalum partanna millum. Við javnbjóðis virðing og við áhugamálinum hjá landi og fólki í huga fer at bera til at røkka eini góðari loysn.

Land og kommunur í Føroyum hava áður gjørt avtalur sínámillum um íløgukarm í árini 2000-2004.

**Bústaðir – ein fjøltáttaður bústaðarmarknaður til alt fólkið**

Eitt fjøltáttað útboð av bústøðum, harundir íbúðir til rímiligan kostnað, lestraríbúðir og bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum og tørvi, eru týðandi tættir í at skapa trivnað, fólkavøkstur og at lækka kostnaðarstøðið. Bústaðir er bústaðarpolitiska amboð landsins at røkka hesum máli. Fyri at geva Bústøðum møguleika at halda fram við menningini, er ætlanin, at tað verður gjørligt hjá Bústøðum at útgeva lánsbrøv fyri at fáa fígging til vega. Hetta vil menna bæði føroyska bústaðarmarknaðin og føroyska fíggjarmarknaðin.

**Eina felags almenna lønarskipan og varskógvaraskipan**

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum fer í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum at gera uppskot til eina meira gjøgnumskygda, rættvísa og tíðarhóskandi lønarskipan fyri almenna geiran. Málið er, at størv

í høvuðsheitum verða lønt í mun til førleikakrøv og ábyrgd. Hartil kunnu onnur serstøk atlit gera, at lønin verður ávirkað. Ætlanin er, at uppskot verður gjørt til eina felags almenna lønartalvu. Ynskt verður eisini at styrkja rættindi og møguleikar hjá starvsfólki hjá tí almenna. Hetta verður gjørt við at seta á stovn felags varskógvaraskipan fyri starvsfólk í almennum starvi.

**Einar grønari Føroyar – frá vektgjaldi til umhvørvisgjald**

Til tess at eggja fólki at velja umhvørvisvinarligar loysnir, verða vektgjøldini á motorakførum umskipað til umhvørvisgjøld. Ætlanin er, at broytingarnar koma í gildi 1. januar 2017. Broytingarnar snúgva seg í høvuðsheitum um, at farið verður burtur frá verandi gjaldi, sum er grundað á vekt á motorakfarinum, til eitt meira umhvørvisgrundað gjald, sum er grundað á CO2-útlátið frá akfarinum. Á henda hátt kunnu fólk lækka gjald sítt við at velja umhvørvisvinarligari bil. Sum liður í at gagnnýta, at øll el-framleiðsla í Føroyum verður grøn í næstu framtíð, verða fólk eggjað til at ogna sær el-bil. Tí verður tíðaravmarkað skipan sett í verk fyri el-bilar, soleiðis at fólk kunnu fáa afturborið part av avgjaldinum á bilin.

**Dagføringar í tonsaskattalóg, kapitalvinningsskattalóg og bankalóg**

Ætlanin er at lætta um umsitingarliga hjá teimum feløgum, ið virka undir tonsaskattalógini, og verður lógardagføring hesum viðvíkjandi løgd fyri Løgtingið. Eisini er greitt, at kapitalvinningsskattalógin hevur tørv á endurskoðan. Í fyrsta umfari varð broyting framd viðvíkjandi exit-reglum í vár. Fyri at tryggja samsvar millum exit- og enter-reglur verður uppskot til dagførdar enter-reglur lagt fyri Løgtingið. Skulu Føroyar hava javnbjóðis fíggjarlóggávu sum onnur lond, ið vit samanbera okkum við, er neyðugt við støðugum dagføringum av bankalóggávuni (Lov om finansiel virksomhed). Dagføring av hesi lóg kemur eisini í tingsetuni.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

**Skapandi vinnur**

Politikkur fyri skapandi vinnur er orðaður. Hetta er fyrsta yvirskipaða ætlan fyri henda vinnugeiran, ið m.a. fevnir um film, telduspøl, tónleik, bókmentir, sniðgávu og arkitektur og matgerðarlist.
Átøkini, sum landsstýrið hevur raðfest fremst, eru skipan av filmshúsi, ið skal lata upp í 2017 og afturberingarskipan til útlendskar filmsframleiðslur. Eisini fer Fróðsskaparsetrið longu í ár undir nýggja listaútbúgving. Arbeitt verður somuleiðis víðari við hinum átøkunum, sum mælt verður til, so at nágreinilig tíðar- og kostnaðarætlan kann verða løgd fyri Løgtingið í heyst.

**Íverksetan**

Íløgurnar í føroyska luttøku í ES-rammuskránna Horizon 2020 fyri fyritøkur byrjar at síggjast aftur. Og tær fyrstu føroysku vinnu- og nýskapanarverkætlanirnar hava fingið stuðul til víðari menning.
Størstu avbjóðingarnar hjá nýskapandi fyritøkum er tó framvegis atgongdin til váðafúsa fígging í Føroym, og at vit enn hava spjaddar og veikar skipanir til at ráðgeva og stuðla teimum, ið bróta upp úr nýggjum.

**Nútíðar føroyskt fíggjarkervi**

Landsstýrið hevur sett í verk eina forkanning, ið skal vísa, hvussu KT-tænasturnar og persónsupplýsingarnar, sum farnar eru av landinum, kunnu flytast heimaftur við fyrimuni.

Hetta er ein týðandi liður í at gera eina vakstrarstrategi fyri føroysku KT-vinnuna, ið skal menna førleikar, skapa arbeiðspláss og økja inntøkurnar, samstundis sum tað mennir KT-trygdina og tryggjar grundleggjandi samfelagslig áhugamál.

**Maritim strategi**

Í løtuni verður arbeitt við at dagføra sjóvinnupolitikkin og at gera eina maritima strategi – arbeiðið verður væntandi liðugt í august/september í ár.

Løgtingið hevur á fíggjarlógini fyri 2016 játtað uml. 800.000 kr. til at marknaðarføra Føroyar sum maritiman ella: sjóvinnu tænastudepil, og maritimi tænastudepilin er eisini raðfestur í játtanarkørmunum fyri komandi ár.

**Integratiónspolitikkur**

Nú eru umleið 1300 útlendingar í Føroyum, og talið veksur alsamt. Fyri at hesi fólk kunnu gerast eitt týðandi ískoyti og tilfeingi fyri Føroyar, er umráðandi, at tey verða integrerað í tað føroyska samfelagið. Integratiónssamskipari er settur, og arbeiðið at tilevna og seta í verk eina integratiónsætlan fyri Føroyar er farið í gongd. Arbeiðið fevnir m.a. um at gera kunningartilfar og betur skipaða undirvísing fyri útlendingar í Føroyum og átøk á arbeiðsmarknaðinum.

**Ferðavinnupolitikkur**

Føroysk ferðavinna hevur tikið dik á seg seinnu árini. Vitjandi við ferðamannaskipum er meira enn fimmfaldað síðani 1999. Samlaði umsetningurin í ferðavinnu vaks við sløkum 30 prosentum frá 2011 til 2013, úr 448 mió. kr. upp í 577 mió. kr., og nýggjastu tølini vísa, at gistingar frá uttanlandsmarknaðinum hækkaðu 12 prosent í 2014.

Fyri at skapa betri karmar um vaksandi vinnuna hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum sett arbeiðsbólk at orða eina heildarætlan fyri føroyska ferðavinnu. Í heildarætlanini, ið skal verða liðug í ár, verður áherðsla løgd á at menna innlendis ferðavinnuna, samstundis sum atlit verða tikin at náttúruvernd og burðardyggari menning í vinnuni.

**Alilóggávan**

Alilóggávan verður endurskoðað. Endamálið er fáa eina greiðari og meira hóskandi skipan fyri nýtslurætt og atgongd til tøku aliøkini. Lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið komandi vár.

Arbeitt verður áhaldandi við at fáa betri tamarhald á lúsatruplleikanum. Landsstýrið hevur júst hert ásetingarnar í lúsakunngerðini, og lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið stutt eftir ólavsøku, um at almannakunngera upplýsingar um støðuna við laksalús.

**Frágreiðing um vinnufeløg landsins**

Við støði í uppskoti um eigarapolitikk landsins og uppskoti um nýggjar reglur um landspartafeløg, sum eru send til hoyringar, fer landsstýrið í heyst at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um vinnufeløg landsins. Í uppskotinum til eigarapolitkk landsins eru orðaðar leiðreglur fyri, hvussu landið skal útinna sín eigaraleiklut í partafeløgum og øðrum líknandi vinnufeløgum, sum landið eigur, og sum liggja uttanfyri fíggjarlóg og landsfyrisitingina, og leiðreglur fyri, hvussu landið væntar, at nevnd og stjórn útinna sín leiðsluleiklut. Uppskotið til leiðreglur og uppskotið til nýggjar reglur fyri landspartafeløg (partafeløg, sum landið

hevur ræði á) hava m.a. sum endamál, at tað skal vera størri opinleiki og gjøgnumskygni viðvíkjandi viðurskiftunum í landpartafeløgum og øðrum líknandi vinnufeløgum hjá landinum.

**Matvørulóggáva**
Í vár samtykti Løgtingið broytingar í matvørulógini, sum hava til endamáls at tryggja, at føroyskar matvørur eru tøkar hjá flestu okkara. Við hesum broytingum fáa smáir framleiðarar høvi at selja sína vøru til matvøruhandlar og matstovur, eins og føroyska matmentanin verður í samsvari við rákið í heiminum í dag. Broytingarnar verða nágreinaðar í kunngerð, ið fær gildi samstundis sum lógarbroytingin, 1. oktober í ár.

**Djóraverndarlógin**
Galdandi djóravendarlóg, ið er frá 1985, verður endurskoðað. Tørvur hevur leingi verið á hesi endurskoðan, tí viðurskiftini eru munandi broytt seinastu stívliga 30 árini. Galdandi lóg snýr seg einamest um gagndýr, men tey nógvu kelidýrini krevja, at eisini tey fáa neyðuga lógarverju, tá ið ræður um røkt og umstøður annars.

**Uttanríkisøkið**
Landsstýrið er farið undir at fyrireika eina tilgongd at fáa í lag ein yvirskipaðan samstarvskarm við ES. Ein slíkur karmur skal verða við til at styrkja tilvitanina um Føroyar í ES kervinum og stuðla undir eina sterkari og fjøltáttaðari fatan av Føroyum sum grannalandi og samstarvsparti hjá ES á ymsum økjum. Partur av tilgongdini verður eisini at viðgera ítøkiligar avbjóðingar, sum føroyingar og føroyskt vinnulív renna seg í í ES skipanini, harímillum avmarkingar á fiskavøruútflutningi.

Í samgonguskjalinum er ásett, at landsstýrið ætlar at søkja um limaskap í EFTA. Henda tilgongd er byrjað. Landsstýrismaðurin hevur hitt íslendska uttanríkisráðharran, norska Evroparáðharran, uttanríkisráðharran í Liktinstein og havt samrøðu við forsetan í Sveis um málið.

Eftir drúgva samráðingartilgongd varð fríhandilssáttmáli við Turkaland undirritaður í fjør. Í Føroyum eru allar formligar mannagongdir lidnar. Fráboðan um, at Løgtingið hevur góðkent sáttmálan, er send Turkalandi, og bíðað verður nú eftir, at turkiska tjóðartingið endaliga góðkennir sáttmálan.

Fyri nøkrum árum síðani varð samband fingið í lag við Kina til tess at vita, um kinverjar eru áhugaðir í at gera fríhandilssáttmála við Føroyar. Síðani hevur uttanríkistænastan samskift við kinesisku myndugleikarnar um málið. Enn ber tó ikki til at siga, nær veruligar samráðingar kunnu fara í gongd.

Sum liður í arbeiðinum at bøta um marknaðaratgongd okkara til Kina er heilsufrøðiligur sáttmáli gjørdur við Kina, sum ger tað møguligt hjá føroyskum fyritøkum at útflyta føroyskan makrel til Kina. Enn er sáttmálin ikki undirritaður, men hann hevur fingið fyribils gildi, til hann verður undirritaður.

Vaksandi áhugi er frá føroysku vinnuni at flyta vørur út til USA. Uppskot til TIFA (Trade and Investment Framework Agreement) sáttmála við USA varð tískil handað sendiharra USA í Keypmannahavn á fundi millum hann og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum í apríl í ár.

Samband er eisini tikið upp við Evro-asiatiska búskaparsamveldið (t.e. Russland, Hvírarussland, Kasakstan, o.o.) Ukraina, og Suðurkorea um at fáa í lag fríhandilssáttmálar millum hesi lond og Føroya. Og sjøtul er settur á eina tilgongd at fáa í lag heilsufrøðiligan sáttmála millum Føroyar og Brasilia.

Innanhýsis samskipan hevur stóran týdning, skulu vit røkka okkara uttanríkispolitisku málum. Alt, ið verður gjørt á uttanríkispolitiska pallinum, eigur at verða gjørt við fyriliti fyri yvirskipaðu áhugamálum landsins. Samstarvið ímillum Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið er styrkt, soleiðis at samráðingar á teimum økjum, sum ráðini varða av, verða samskipað. Á tann hátt verða partarnir betur fyri at fremja uttanríkispolitisku áhugamál Føroya.

Hoyvíkssáttmálin hevur í heyst 10 ár á baki og verður nú eftirmettur. Er tørvur á tí, eiga neyðug stig at verða tikin við íslendsku stjórnina um at dagføra sáttmálan.

Í heyst er væntandi, at báðir marknasáttmálarnir við Noreg og Ísland um ytra landgrunnin norðan fyri Føroyar fara at verða undirritaðir. Tá verður endaliga staðfest, at landgrunnur Føroya er vaksin við 27.000 ferkilometrum.

Føroyar hava bundið seg til flestu mannarættindasáttmálarnar hjá ST og eru javnan til hoyringar um at fremja hesar sáttmálar í verki. Fjórða hvørt ár skipar ST fyri einari yvirskipaðari hoyring, Universal Periodic Review, har mannarættindastøðan í hvørjum einstøkum landi verður eftirmett, og í ár umboðaði landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum Føroyar til hoyringina. Millum tilmælini frá londunum í Mannarættindaráðnum var, at óheft eftirlit við mannarættindum verður skipað í Føroyum. Landsstýrismaðurin hevur í hesum sambandi sett ein arbeiðsbólk at kanna og koma við tilmæli um, hvussu eina mannarættindaeind ella ráð kann verða skipað í Føroyum. Arbeiðsbólkurin letur tilmæli úr hondum seinni í ár.

Virkað verður fyri sjálvstøðugum føroyskum limaskapi í norðurlendska samstarvinum. Eftir ætlan verður ein formlig umsókn latin Norðurlandaráðnum og Norðurlendska ráðharraráðnum seinni í ár.

Ætlanin er at skipa fyri eini altjóða ráðstevnu í Føroyum um framtíðina og avbjóðingarnar hjá smátjóðum og sjálvstýrandi londum í Evropa.

## SAMFERÐSLU- OG ARBEIÐSMARKNAÐARMÁL

### Arbeiðsmarknaðarmál

Arbeiðsloysið í Føroyum er í løtuni 2,3 %, og tað er søguliga lágt. Hjá Arbeiðsloysisskipanini (ALS) gongst væl. Methøgu lønarútreiðslurnar gera, at inngjøldini til ALS eru methøg, og sera lága arbeiðsloysið ger, at útgjøld til arbeiðsloysisstuðul eru tey lægstu síðani 2008. ALS hevði eitt avlop, sum var slakar hálvthundrað mió. kr. í 2015, og er tað ítøkiligt tekin um, at skipanin aftur er komin á beint eftir kreppuna í 2010 og 2011.

Tá ið arbeiðsloysið er so lágt, sum tað er nú, eigur Arbeiðsloysisskipanin at hava eitt hóskandi avlop, so at skipanin aftur verður konsoliderað og hevur neyðuga fíggjarliga máttin at standa ímóti við, tá arbeiðsloysið einaferð fer at hækka aftur. Eginognin, sum var hægst í 2009, var 742 mió. kr., er eftir fleiri ár við minking, nú aftur farin at vaksa av álvara, og var hon við árslok í 2015 komin upp á 361 mió. kr.
Tillagingar eru gjørdar í reglunum fyri Arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at langtíðarhaldbarið hjá skipanini nú er betur tryggjað, og á tann hátt slepst undan áhaldandi at laga skipanina til broytingar í arbeiðsloysinum.
Hóast tað gongst væl í Føroyum, og vit hava søguliga lágt arbeiðsloysi, so er støðan tann, at yvir 500 fólk eru skrásett sum arbeiðsleys hjá ALS, og vit mugu taka inn útlendska arbeiðsmegi fyri at nøkta tann tørv, sum vinnan hevur á at fáa skikkaða arbeiðsmegi.
Trupulleikin er, at tey fólkini, sum eru skrásett í skipanini hjá ALS, ikki hava teir førleikar, sum vinnuni tørvar.
Skulu vit koma hesum trupulleika til lívs, er neyðugt at geva hesum fólkum førleikar, sum gera, at tað verður brúk fyri teimum á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrið fer tí undir at skipa eina vaksnamannalæru, soleiðis at fólk fáa teir førleikar, sum arbeiðsmarknaðinum tørvar. Hetta er eitt mál, sum verður raðfest høgt.
ALS-stýrið hevur nú, ið tað vísir seg, at størstu útgjøldini úr skipanini fara til virki innan alivinnuna og uppsjóvarvinnuna, heitt á landsstýrið um at broyta skipanina, tí fyritreytirnar fyri skipanini eru broyttar. Landsstýrið viðger málið.

Ein møguleiki, sum verður kannaður, er, um fiskavirkisskipanin kann verða broytt í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum ein liður í einari semju um fastlønarsáttmálar fyri ávís virki, sum í dag eru í fiskavirkisskipanini.

Nakað av tí fyrsta, sum samgongan gjørdi, var at leingja barsilsfarloyvi úr 38 vikum til 44 vikur. Samgongan hevur sum mál at leingja barsilsfarloyvið til 1 ár og sum heild at gera barsilsskipanina liðiligari.
Landsstýrið leggur stóran dent á, at vit í Føroyum hava eitt væl virkandi arbeiðsumhvørvi. Arbeiðsgevarar hava ábyrgdina av at tryggja eitt trygt og heilsugott arbeiðsumhvørvi, og landsstýrið hevur ábyrgdina av, at eftirlit er við, at arbeiðsgevarnir halda sínar skyldur.
Tað er einki dulsmál, at játtanin til Arbeiðseftirlitið hevur verið niðurraðfest seinnu árini, samstundis sum virksemið í samfelagnum er vaksið.
Landsstýrið hevur tí fingið játtanina til Arbeiðseftirlitið hækkaða og fer framhaldandi at raðfesta arbeiðsumhvørvið, m.a. við at hyggja nærri at bygnaðinum.

**Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin**
Í 2015 kom ferð á Føroya størstu byggiverkætlan nakrantíð at byggja Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin. Jarðfrøðiligar forkanningar eru gjørdar, og projekteringin av tunlunum var liðug í mai mánaði. Við atliti at trygd, jarðfrøði og búskapi er gjølla kannað, hvar tunlarnir liggja best, og eru tunnilslinjurnar lagdar samsvarandi tí.
Arbeiðið at gera arbeiðsvegir og inntøk byrjaði í mars mánaði í ár norðan fyri Hvítanes og við sjógv á Strondum. At føroyskir arbeiðstakarar kunnu gera alt vegarbeiðið sparir tíð. Hetta arbeiði verður eftir ætlan liðugt í komandi mánaði.

At byggja Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin er ein verkætlan. Ætlanin er at fáa eina samlaða fígging til verkætlanina. Fíggingin av tunnlunum verður avgreidd aftaná, at felagið P/F Eystur- og Sandoyartunnilin hevur fingið tilboðini frá arbeiðstakarunum upp á at gera báðar tunlarnar, væntandi í september í ár. Gongst, sum ætlað, verður fyrsta skotið til Eysturoyartunnilin latið av í ár.

**Vágatunnilin**
Nú ið lánini, sum P/F Vágatunnilin hevur tikið til at gera Vágatunnilin, eru afturgoldin, er grundarlag fyri at endurskoða príspolitikkin hjá felagnum.

Arbeitt verður við samhaldsfastari samferðsluloysn fyri alt landið.

**Samferðsluætlan**
Eitt gott samferðslukervi er ein fyritreyt fyri menning og trivnaði í landinum. Farið verður undir at dagføra samferðsluætlanina, sum skal galda fyri 2016 – 2028. Endamálið er at geva politisku skipanini eitt fakligt grundarlag fyri at útbyggja samferðslukervið.

**Flutningskostnaður**
Arbeitt verður fram ímóti at javnseta ferða – og flutingskostnaðin kring landið, soleiðis at borgarar og vinna hava eins góð kor um alt landið.

**Viðlíkahald av vegum og bygningum**
Landsvegakervið veksur alsamt, og fleiri krøv verða sett til dygd og trygd til vega- og tunnilsgerð, viðlíkahald og rakstur. Bygningshópur landsins er stórur og í ov ringum standi.
Ásannast má, at viðlíkahaldstørvurin er stórur, og at loysnir mugu finnast fyri, hvussu vit halda við líka, fíggja og reka vegakervið og bygningar landsins.

**Hvalbiartunnil**
Nýggj hvalbiarfarleið er boðin út til prosjekteringar. Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt til várs. Miðað verður eftir at gera tunnilin í hesum samgonguskeiðinum.

**Avloysaraskip**
Strandfaraskip landsins hava stóran tørv á einum avloysaraskipi (eykaskipi), soleiðis at stovnurin kann røkja sína flutningsskyldu til fulnar. Sum nú er, noyðist stovnurin at leiga avloysaraskip hvørja ferð, skip fara í dokk, ella okkurt skip er í ólagi. Stovnurin hevur størri frælsi at leggja virksemið til rættis, kann hava ein støðugari rakstur, og hækka tænastustigið við einum eykaskipi. Arbeitt verður við at finna eina loysn.

## ALMANNAMÁL

**Lætti til barnafamiljur í fátækraváða**
Henda samgongan setti sær beinanvegin fyri at lata barnafamiljum, ið livdu undir fátækramarkinum, ein bráðfeingis fíggjarligan lætta. Løgtingslóg um familjuískoyti varð samtykt í desember í fjør, longu tríggjar mánaðir eftir at samgongan varð skipað.
Børn og barnafamiljur í fátækraváða eru tíbetur fækkað seinastu árini.

**Pensjónsnýskipan**
Tíverri gongur tað skeiva leið hjá okkara fólkapensjónistum. Tað er ikki nøktandi, at inntøkan hjá fólkapensjónistum ikki er vaksin eins nógv og inntøkan hjá øllum øðrum aldursbólkum her á landi.
Hetta er eitt mál, sum verður viðgjørt í pensjónsnýskipanini, sum skal tryggja, at øll í Føroyum hava rætt til jøvn og virðilig fíggjarlig kor á ellisárum, um somu tíð sum skipanin verður gjørd burðardygg.
Almannamálaráðið og Fíggjarmálaráðið arbeiða í tøttum samstarvi við at leggja til rættis eitt tilmæli til politisku skipanina um eina pensjónsnýskipan. Arbeiðið er sera umfatandi og viðger allar týðandi tættir í føroysku pensjónsskipanini. Umboð fyri allar teir politisku flokkarnar hava verið við í pensjónsnýskipanarbólki síðani januar í ár. Ætlanin er, at lógarpakki verður lagdur fyri Løgtingið í heyst.

**Pensjónsviðurskifti í ríkisfelagsskapinum**
Arbeiðsbólkurin, sum skuldi greina pensjónsviðurskiftini í ríkisfelagsskapinum, er liðugur við sítt arbeiði. Í frágreiðingini verður millum annað staðfest, at grundarlagið undir at fáa pensjón er ikki eins í ymsu pørtunum av ríkisfelagsskapinum, serliga tá ið tað snýr seg um fyritíðarpensjón. Tað kann vera ein forðing, tá ið flutt verður millum ríkispartarnar.
Hóast Løgtingið hevur samtykt, at fyritíðarpensjónistar, ið búseta seg í Danmark ella í Grønlandi eftir at hava fingið tillutað fyritíðarpensjón, varðveita rættin til fyritíðarpensjón, í mesta lagi upp til 3 ár, so er hetta ikki ein varðandi ella nøktandi loysn.
Við tí fyri eyga, at fáa eina varðandi loysn á hesum viðurskiftum, er ynski sett fram um framhaldandi politiskar samráðingar millum myndugleikarnar í ríkispørtunum. Ein varðandi loysn hevur høga politiska raðfesting. Nú arbeiðið við frágreiðingini er liðugt, byrja innanhýsis fyrireikingar til samráðingar millum partarnar, sum væntandi byrja tíðliga í heyst.

**Sjúkradagpengar**
Ein týðandi trygdarskipan fyri ein vælvirkandi arbeiðsmarknað er dagpeningaskipanin, sum tryggjar persónum, sum gerast óarbeiðsførir vegna sjúku ella skaða, fíggjarligan stuðul, tá inntøkan frá arbeiðinum ikki er har. Ætlanin er at dagføra og bøta um dagpeningalógina. Lutfallið millum tað almenna og arbeiðsgevarar viðvíkjandi gjaldi av sjúkradøgum verður býtt javnari millum partarnar. Dagpeningarlógin skal fevna um alla veiting vegna inntøkumiss í sambandi við óarbeiðsføri. Lógin um sjúkratrygd til fiskimenn verður tí sett úr gildi. Sjálvboðin trygging skal fáast í eina fasta hóskandi legu. Umframt at dagpeningaskipanin skal taka hædd fyri tørvinum hjá fyritíðarpensjónistum og persónum, sum skulu gjøgnum longrivarandi sjúkuviðgerð.

**Rúmligi arbeiðsmarknaðurin (vaksnamannaútbúgving)**

Fyri framhaldandi at styrkja um atgongdina til arbeiðsmarknaðin fyri øll, er Almannamálaráðið, saman við Mentamálaráðnum og Samferðslumálaráðnum, farið undir at útgreina, hvussu vit, saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, kunnu íverkseta skipaða vaksnamannaútbúgving í Føroyum. Vaksnamannaútbúgving hevur ein týðandi leiklut fyri arbeiðsmarknaðin og trivnaðin hjá landsins borgarum, ikki minst tá ið talan er um borgarar við skerdum førleika og teimum, sum eru í vanda fyri at missa sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

**Vardir bústaðir**

Sitandi samgonga hevur sett skjøtul á eina tilgongd at útvega fleiri og meira nútíðarhóskandi bústaðir til fólk, sum bera brek. Í ár er ein bú- og viðgerðarstovnur latin upp til ung fólk við sálarligum avbjóðingum í Tórshavn. Bú- og umlættingardepilin á Sandi verður somuleiðis liðugur, og byggiskráin til nýggjan bú- og umlættingarstovn til børn og ung við autismu er gjørd.

Tilgongdin at útvega fleiri vardar bústaðir heldur fram. Ein tørvslýsing vísir, at størsti tørvurin á vardum bústøðum er í høvuðstaðarøkinum. Umframt at tørvur er á fleiri bústøðum, er tørvur eisini á at skapa tíðarhóskandi karmar á verandi sambýlum. Umframt tær útvið 20 mkr, sum eru tøkar í ár, eru 60 mkr settar av til at byggja stovnar og sambýli til fólk við serligum tørvi næstu 4 árini.

Føroya Bústaðafelag (Bústaðir) er ein týdningarmikil viðleikari at útvega vardar bústaðir. Ein búfelagsskapur er latin upp í Klaksvík, og næstur í røðini verður ein búfelagsskapur í Runavík. Umframt hesar hevur Bústaðir givið tilsøgn um at útvega 2 búfelagsskapir í Tórshavn, ein til fólk við sálarsjúku og ein til fólk við menningartarni, við 12 íbúðum í hvørjum.

**Bústaðarpolitiskar raðfestingar**

Samstundis sum arbeitt verður við at útvega Bústøðum møguleikar at útvega fígging við at skriva út lánsbrøv, hevur samgongan viðgjørt raðfestingarnar hjá landinum í samband við bústaðarpolitikkin, har dentur hevur verið lagdur á at útvega vanligar leiguíbúðir til ein rímiligan kostnað og at útvega fleiri vardar íbúðir kring landið til fólk, sum bera brek.

**Nýggj tænastulóg**

Tá tað snýr seg um tænastur til fólk, sum bera brek, so hevur kjakið um manglandi bústaðartilboð fylt nógv seinastu árini, meðan minni fokus hevur verið á innihaldið á bústøðunum og í øðrum tilboðum, sum Almannaverkið veitir. Sjóneykan verður nú sett á tænastur, sum stuðla undir, at borgarar, sum bera brek, kunnu hava eitt virkið og innihaldsríkt lív á jøvnum føti við aðrar føroyingar.

Almannamálaráðið arbeiðir saman við einum arbeiðsbólki, sum er breitt samansettur, við at orða ein tænastupolitikk, sum skal seta kós fyri, hvussu vit skipa okkara vælferðartænastur á almannaøkinum. Politikkurin skal verða grundarlag undir einari nýggjari tænastulóg, sum landsstýriskvinnan í almannamálum væntandi leggur fram í hesi tingsetu. Lógin skal betra rættartrygdina hjá borgarum, sum bera brek, og skal betra innihaldið í tænastum, sum tey fáa í dag frá Almannaverkinum. Tænastulógin verður ætlandi ein nýggj høvuðslóg, sum kemur í staðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um tænastur, sum t.d. stuðulsfólkaskipanina og bútilboð. Ætlanin er samstundis at flyta ásetingar um til dømis uppihaldsskyldu og afturgjaldsskyldu úr forsorgarlógini í aðra lóggávu soleiðis, at forsorgarlógin umsíður verður sett úr gildi.

**Samskipan av vælferðartænastum – Markamótsskjalið**
Sonevnda Markamótsskjalið er nú undirskrivað, og harvið eru lunnar lagdir undir gott samstarv og samskipan millum land og kommunur, tá tænastur verða veittar borgarum. Við hesum skjali er kósin sett fyri, hvussu loysnir finnast, tá borgarar hava tørv á tænastum frá fleiri almennum myndugleikum og partarnir vóna, at borgarin kann fáa eina betri og meira samanhangandi tænastu.
Komandi mánaðirnar verða neyvari vegleiðingar gjørdar, ið fara at gera handfaringina av markamótsmálum einfaldari, bæði hjá myndugleikum og borgarum og sonevnda markamótsnevndin, ið skal handfara ósemjur, fer eisini til verka fyrsta dagin.

**Endurvenjing**
Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at raðfesta arbeiðið við endurvenjing. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri heilsuverkið, almannaverkið og kommunala geiran hevur latið úr hondum eitt tilmæli um samskipaða endurvenjing. Tilmælið leggur m.a. upp til, at fleiri endurvenjingartilboð verða stovnsett serliga í sjúkrahúsverkinum, og at samstarvið og samskiftið millum ymisku geirarnar verður styrkt við endurvenjingarætlan og samskipan. Eisini verður mælt til, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur í mun til endurvenjing gerst greiðari, og at tilboðini hjá landinum gerst landsfevnandi. Landsstýrið fer í heyst at viðgera og taka støðu til tilmælið.

**Javnstøða**
Javnstøða er ein forteyt fyri einum burðardyggum Føroyum, einum samfelag, ið gagnnýtir øll talentini og alt tað menniskjaliga tilfeingið. Sum ein liður í arbeiðinum hjá samgonguni at styrkja javnstøðupolitikkin er landsstýriskvinnan í javnstøðumálum farin undir at orða ein javnstøðupolitikk. Javnstøða snýr seg um frælsi og ábyrgd hjá kvinnum sum hjá monnum, og tí er eitt mál at fáa menn meiri tilvitaðar um javnstøðumál og teirra rætt til at vera um familjuna. Arbeitt verður við at orða eina virkisskrá fyri javnstøðu 2016-2021, sum fer at umrøða evni sum kynsbýtta arbeiðsmarknaðin, longri burðarfarloyvi eisini til pápar, útbúgvingarøkið, harðskap og kynsligan ágang. Virkisskráin verður eftir ætlan løgd til aðalorðaskifti í hesari tingsetuni.

**Harðskapur og kynsligur ágangur**
Heildarætlanin um harðskap í parløgum og nærsambondum verður eftirmett og heldur fram, eins og arbeiðið at seta í verk heildarætlanina um kynsligan ágang byrjar nú.

## HEILSU- OG INNLENDISMÁL

**Menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið**
Føroyska sjúkrahúsverkið stendur fyri stórum avbjóðingum. Eins og í okkara grannalondum veksur tørvurin á tænastum skjótt. Vit gerast fleiri eldri, og nýggir og betri viðgerðarhættir síggja dagsins ljós. Tað er at gleðast um, men tað setur stór krøv til manning og fígging. Samstundis, sum henda gongdin fer fram, er tað ein stór avbjóðing at fáa tey heilsustarvsfólk, sum neyðug eru til at veita viðgerðirnar á besta stigi. Játtanin skal vaksa, men vit loysa ikki allar trupulleikar, uttan at tora at hugsa nýggjar og øðrvísi loysnir.

Samgongan hevur tikið henda spurning í álvara, og í januar varð sjøtul settur á at orða eina menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið, sum varð handað beint fyri summarfrítíðina. Við grundarlagi í menningarætlanini verður aðalorðaskifti í Løgtinginum í heyst um, hvussu vit kunnu menna okkara sjúkrahúsverk eftir verandi og komandi avbjóðingum. Eitt aðalmálið verður at fáa gagnnýtt øll trý sjúkrahúsini betur.

**Fleiri serútbúgvin heilsustarvsfólk**

Skulu vit framvegis bjóða føroyingum viðgerðir í Føroyum á sama stigi, okkara grannalond bjóða, er neyðugt at fáa fleiri serútbúgvin heilsustarvsfólk. Byrjað verður at seta sjóneykuna á serlæknaøkið, og tí eru á játtanarkørmunum fyri 2017 settar 5 mió. kr. av til økið. Við hesum verður eitt týdningarmikið stig tikið til at fáa fleiri serlæknar til føroyska heilsuverkið. Tað fer at gagna øllum, herundir sjúkrahúsverkinum. Skurðøkið er longu uppraðfest, og onnur munagóð átøk eru gjørd í sjúkrahúsverkinum, m.a. er raðfest at útbúgva fleiri sjúkrarøktarfrøðingar. Fetini skulu tó verða fleiri, og eru tí ætlanir um at gera meira burtur úr heilsuverkinum komandi árini.

**Nýggjur meginbygningur til Landssjúkrahúsið**

Útboð er í løtuni til nýggjan meginbygning til Landssjúkrahúsið, og farið verður nú undir ein av størstu og týdningarmestu útbyggingunum í Føroya søgu, sum ætlandi skal verða liðug í 2020.
Nýggi meginbygningurin er nevndur H-bygningurin. Har verður nýggjur psykiatriskur depil við einastovum, nýggj medisinsk seingjardeild við einastovum, nýggj føði- og barsilsdeild við einastovum, nýggj endurmenningareind og nýggjur køkur. Munandi betri pláss verður til ambulant virksemi frameftir, tí at seingjarpláss verða flutt frá verandi bygningum til nýggja bygningin. Bygningurin verður hitaður við sjóhita, og sostatt gjørdur í samsvari við politikk landsstýrisins um at minka nýtsluna av fossilum orkukeldum. Uppskot um at dagføra verklagslógina verður lagt fram eftir ólavsøku.
Meðan bíðað verður eftir nýggjum psykiatriskum depli, er raðfest at bøta um verandi hølisviðurskifti á psykiatriska deplinum, og kunnu vit fegnast um tað.

**Heildarætlan skal leggja slóðina fyri framtíðar psykiatri í Føroyum**

Samgongan raðfestir hjálpina til teirra, ið stríðast við sálarsjúkur í Føroyum. Seinnu árini eru stór tøk tikin, og á Psykiatriska deplinum er seingjartalið lækkað í einari tilvitaðari menning, har virksemið alsamt meira verður skipað sum dagvirksemi, heldur enn við innleggingum. Barna- og ungdómspsykiatriin er í støðugari menning, og alt fleiri børn fáa nú tilboð um hjálp. Í vár varð økispsykiatri skipað í Suðuroy og í Vágum, og økispsykiatriin fer í ár at fevna um allar Føroyar, sum liður í tí at bjóða psykiatriska tænastu til fleiri og nærri borgarunum.
Fyri summarsteðgin varð sjøtul settur á tilgongd at flyta føroysku psykiatriina fremst, tá ið tvørfakligur arbeiðsbólkur varð settur at gera heildarætlan fyri økið. Málið er, at øll við sálarsjúku skulu fáa eina javnbjóðis, dygdargóða og trygga viðgerð og tænastu, so tætt at gerandislívinum, sum til ber. Vit skulu hava eina psykiatri á sama fakliga stigi, sum okkara grannalond, men eiga ikki bara at eftirapa loysnir, sum eru kendar. Psykiatriin skal skipast á ein hátt, at hon gagnar borgarunum best, samstundis sum vit gagnnýta starvsfólkatilfeingið best.

**Primeri geirin í heilsuverkinum**
Neyðugt er at samantvinna teir ymsu partarnar í heilsuverkinum uppaftur meiri. Á henda hátt fæst eitt heilsuverk, har tænastan til borgaran verður í miðdeplinum, samstundis sum avmarkaða starvsfólka- og fíggjarliga tilfeingið í heilsuverkinum verður gagnnýtt skilabest. Dygdargott tvørfakligt samstarv er neyðugt til tess at røkka málinum.
Galdandi kommunulæknaskipan kom í gildi fyrst í 1900-talinum, og víðfevndar broytingar eru farnar fram í samfelagnum, bæði tá ið tað snýr seg um tilboð og um tørv á heilsuveitingum. Men hóast hesar víðfevndu samfelagsbroytingar, eru bert smávegis tillagingar gjørdar í kommunulæknaskipanini øll hesi árini. Henda gongdin hevur havt við sær, at kommunulæknaskipanin er vorðin støðugt meira ótíðarhóskandi. Tað gerst alsamt eyðsýniligari, at øll kommunulæknaskipanin stendur á einum vegamóti, og vandi er fyri, at hon fer fyri bakka, um munadygg tiltøk ikki verða sett í verk sum skjótast at bøta støðuna.

Sum áður nevnt, er menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið handað. Hildið verður nú fram við tilgongd, sum skal menna heilsutænastur í nærumhvørvinum. Neyðugt er at halda fram við arbeiðinum at fara frá gomlu kommunulæknaskipanini, har kommunulæknar sita einsamallir kring landið, til eina skipan, sum veitir borgarum heilsutænastur í heilsudeplum kring landið.

**Kommunuval**
8. november, ið er annar týsdagur í november, verður kommunuval. Tá skulu veljast 201 kommunustýrislimir í tey 29 kommununustýrini. Ein valstaður verður færri næsta valskeið, tí Húsa- og Klaksvíkar kommuna hava gjørt av at leggja saman. 17 kommunur eru so mikið fólkaríkar, at tær gera sjálvar av, hvussu nógvir kommunustýrislimirnir vera. Teir skulu vera millum 7 og 17. 12 kommunur hava færri enn 500 íbúgvar, av hesum eru 9, sum skulu hava 5 kommunustýrislimir og 3, sum skulu hava 3 kommunustýrislimir.

**Útoyggjar**
Fyri borgaran á útoyggj man gerandisdagurin og gerandislívið vera tað týdningarmiklasta. Tí má alla tíðina havast fyri eyga at bøta korini hjá fólk at liva og virka á staðnum. Ferðavinnan á útoyggj stimbrar økismenning, men strembast skal eftir at reka burðadygga ferðavinnu, sum hevur fyrilit fyri plantu- og djóralívi, soleiðis at tað serstaka í okkara mentan verður varðveitt.

**Ferð á grøna orku**
Samgongan hevur sett sær glæsilig mál á orkuøkinum. Í samgonguskjalinum hava vit sett sum mál, at í 2030 skal øll elorka á landi stava frá varandi orku, og at longu um 10 ár skal helvtin av øllum sethúsum og bygningum í Føroyum verða hitað við grønari orku. Til tess at røkka framsøknu málunum á orkuøkinum, skulu nógv átøk gerast, bæði viðvíkjandi framleiðslu, flutningi og nýtslu. Gongd er sett á skiftið á framleiðslusíðuni og viðvíkjandi upphiting.
Í heyst verður farið undir at orða ein ítøkiligan orkupolitikk, ið skal raðfesta átøk, sum skulu gerast til tess at náa settu málunum í samgonguskjalinum. Orkumál hava týdning víða um í samfelagnum, og arbeiðið at orða orkupolitikkin skal tí eisini grundfestast samsvarandi hesum við breiðari luttøku frá ymsum áhugabólkum. Sum eitt stig á leiðini móti orkuskiftinum, er á løgtingsfíggjarlógini avsettur peningur, ið verður nýttur til verkætlanir, sum skulu verða við til at seta ferð á grøna orku.

**Hjúnabandslógin**
29. apríl 2016 samtykti Løgtingið at broyta hjúnabandslógina soleiðis, at samkynd kunnu giftast borgarliga. Við at samtykkja hesar broytingar í hjúnabandslógini eru vit komin eitt stórt fet nærri einum samfelag, sum virðir og javnsetur allar borgarar í Føroyum. Í løtuni verður viðgjørt, hvussu samtyktu broytingarnar í hjúnabandslógini skulu fremjast í verki.

**Nýggj lóg um náttúruvernd**
Sjøtul er settur á arbeiðið at gera lóg um náttúruvernd. Yvirskipaða endamálið er at varðveita og verja margfeldið í náttúruni, samstundis sum pláss verður fyri at menna samfelagið. Lógin er ein neyðug fortreyt fyri at skapa nútíðar lógar- og fyrisitingarligar karmar um framtíðar náttúruvernd í landinum og gevur pørtum, áhugaðum, kommunustýrum o.ø. rætt at koma til orðanna í náttúruverndarmálum, áðrenn avgerðir verða tiknar. Við nýggju lógini er ætlanin at fara burtur frá gomlu skipanini, har náttúrufriðing í stóran mun bygdi á atlit at vakurleika og sjáldsemi, til nútíðar náttúruvernd, sum í størri mun byggir á atlit at djóra- og plantusløgum á landi og sjógvi.

**Fólkaheilsa**
Samgongan hevur sett sær sum mál at arbeiða miðvíst við fyribyrging, og at reglulig fólkaheilsuátøk og skjót endurmenning og venjing verða raðfest høgt. Nýtt fólkaheilsuráð er valt, og sum nakað nýtt er sálarlig heilsa sum partur av arbeiðinum við fólkaheilsu sett í brennidepilin. Fyri at stuðla fyribyrgjandi arbeiði hjá familjum er raðfest at seta játtan av til at víðka tænastuna frá Gigni til børn millum 2 og 7 ár. Harumframt er sjøtul settur á at samskipa regluverkið innan endurvenjing innanfyri og ímillum ymsu geirarnar. Í næstum verða kunngerðir lýstar, sum fara at gera tænastur til ein bólk av borgarum, sum alt ov leingi eru dotnir niður millum ymiskar skipanir, sjónligar. Á rúsdrekka- og rúsevnisøkinum fer millum annað at verða lagdur dentur á fyribyrgjandi og tálmandi tiltøk og at menna og víðka viðgerðartilboðini til misnýtarar og avvarðandi.

## UNDIRVÍSINGAR- OG MENTAMÁL

**Førleikamenning**
Krøvini til skúlan eru stór, og tað skulu tey vera, tí at samfelagið er soleiðis skipað, at tað er trupult hjá tí unga, ið fer úr fólkaskúlanum at klára seg í útbúgvingarskipanini og á arbeiðsmarknaðinum uttan grundleggjandi fakligan og sosialan førleika.

Hetta má síggjast aftur í tí førleikamenning, vit sum land bjóða teimum, ið starvast í fólkaskúlanum. Áherðsla verður tí løgd á, at bæði lærarar og leiðsla fáa møguleika at menna sín námsfrøðiliga og fakliga førleika at átaka sær ta stóru uppgávu at tryggja øllum børnum og ungum eina skúlagongd, sum leggur upp fyri trivnað og miðvísa læring og menning.

Seinastu árini hava vit lagt stóran dent á at menna førleikar innan lesing og hava útbúgvið serlærarar, lesivegleiðarar og orðblindalærarar. Umframt at skipað eru skeið í fakligari lesing fyri allar lærarar fólkaskúlans. Tvær drúgvar eftirútbúgvingar eru eisini skipaðar, sum báðar eru 60 ects, og verða tey lesandi liðug næsta summar. Talan er um vegleiðaraútbúgving og útbúgving sum støddfrøðivegleiðari. Eisini verður skeið skipað fyri allar lærarar í floksleiðslu.

Okkum vantar KT varðar, og hetta er eitt økið, sum verður raðfest, serliga tí talgilding í fólkaskúlanum gongur við rúkandi ferð bæði KT sum amboð í læring, talgildir undirvísingarmiðlar og avgerðin um at talgilda royndir og próvtøkur fólkaskúlans.

Trivnaðarøkið verður raðfest, og tørvur er á at útbúgva fleiri akt-lærarar, tí at tað eru nógvir skúlar, sum ikki hava akt-lærara og arbeiðið á hesum øki minkar ikki. Trivnaður er so týðandi fyri alla læring, og vit vita, at tað eru bæði børn og ung, sum hava ilt við at fóta sær.

Leiðslan skal ganga á odda í menning skúlans, og tí eru stig tikin til at skipa eina umfatandi leiðsluútbúgving í námsfrøðiligari leiðslu, læring og fyrisiting. Ein útbúgving, sum hevur fyrilit fyri fleiri leiðsluligum førleikum. Útbúgvingin byrjar eftir ætlan næsta skúlaár.

**Trivnaður og happing**

Samgongan tekur trupulleikar við trivnaði og happing á dagstovnum, í fólkaskúla og á miðnámi í størsta álvara. Átøk eru tí sett í verk í fólkaskúlanum við trivnaðardegi og tilfari, og ráðstevna hevur verið fyri øll starvsfólk í fólkaskúlanum. Á dagstovnaøkinum er sjøtul settur á samskipaða verkætlan at fáa til vega tilfar at stimbra trivnað og basa happing. Í miðnámskúlanum er sálarfrøðilig tænasta sett í verk við tí endamáli at økja um trivnaðin og minka um fráfallið millum næmingarnar umframt, at lestrarvegleiðaraskipanin er styrkt við m.ø. útbúgving á masterstigi.

**Tilfar**

Játtanin til bæði Nám og Bókadeild Føroya Lærarafelags er hækkað í hesum fíggjarári við atliti at ávikavist talgildum tilfari og bókmentum til børn og ung.
Ferð er seinasta árið komið á at talgilda undirvísingartilfar, serliga til fólkaskúlan. Nám hevur keypt atgongd til fleksbókapallin hjá Alinea og S-bókapallin hjá Systime. Allar taskubøkur og mestsum allar einnýtisbøkur, ið Nám gevur út, verða talgildar til skúlaársbyrjan 2016 ella í skúlaárinum 2016/17. So tað fer at bera til hjá skúlunum at velja, um teir vilja nýta pappír, skíggjar ella bæði.

**Styrkja málsligu menningina hjá børnum**

Einki er at ivast í, at málsliga menningin hjá okkum øllum ger trivnaðin betri, so at vit øll trívast í hesum samfelagnum, vit liva í. Samgongan hevur tí eisini sett sær fyri at styrkja málsligu menningina hjá børnum og vaksnum. Hetta kann gerast á ymiskan hátt, eitt nú við áhaldandi at útvega børnum og vaksnum meiri lesitilfar. Við at hækka ymiskar játtanir á verandi fíggjarlóg, kann sigast, at hetta arbeiðið longu er byrjað. Ætlanin er eisini í næstum, saman við avvarðandi stovnum og feløgum at skipa fyri almennum átøkum og fyrireika tiltøk, sum kunnu stimbra málsligu menningina í samfelagnum.

**Glasir**

Á sumri 2015 var lógin um skúladepil í Markangili samtykt. Føroya Handilsskúli, Tekniski skúli í Tórshavn og Føroya Studentaskúla og HF-skeið eru longu komnir væl áleiðis við tilgongdini at leggja saman. Snøgga navnið Glasir er m.a. úrslit av hesi tilgongd, og gongst sum ætlað, verður flutt inn um stívliga eitt ár. Tá er málið rokkið at bjóða teim ungu nærum allar miðnámsútbúgvingar, yrkisligar sum gymnasialar – undir einum og sama taki.

**Endurskoðan av gymnasiala økinum**

Á sumri 2013 vórðu teir gomlu skúlarnir – handilsskúlin, studentaskúlin, tekniski skúlin, fiskivinnuskúlin og HF-skeiðini lagdir saman í eina og somu gymnasialu skúlaskipan – ta sokallaðu “breytaskipanina”. Skipanin hevur nú virkað í 3 ár, og fyrstu studentarnir hava júst fingið prógv eftir hesum nýggja leisti. Nýggja skipanin hevur virkað væl, men kortini er ætlanin at lata allar aktørar sleppa at eftirmeta við denti á bygnað, lærugreinir, skrivlig avrik, próvtøkur o.s.fr. Tað er skilagott við áhaldandi tillaging, og tað er alla tíðina neyðugt at leita eftir tí, sum er best fyri næmingin.

**Nýskipan av yrkisútbúgvingum**

Landsstýriskvinnan í mentamálum er saman við vinnuni farin undir at endurskoða yrkisútbúgvingarnar. Endamálið er at fáa eina smidligari skúlaskipan fyri teknisku útbúgvingarnar bæði viðvíkjandi longd og upptøku til skúlaskeiðini, samstundis sum arbeitt verður við at fáa tilgongdina av skrivaðum lærusáttmálum javnari. Eisini verður arbeitt við næmingaætlan og kunningarpartinum umframt at sundurskilja (differentiera) fakliga innihaldið í almennum lærugreinum frá 10. floks stigi til gymnasialt stig. Ætlandi verður arbeiðið liðugt á heysti 2017.

**Vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil í Føroyum**

Arbeiðsbólkur verður í næstum settur við umboðum úr Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum og Samferðslumálaráðnum, sum skal útgreina, hvussu og í hvønn mun tey trý stjórnarráðini kunnu verða við til at fyrireika og seta í verk skipaða vaksnamannaútbúgving í Føroyum. Umráðandi er, at bæði avvarðandi myndugleikar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum samstarva um skipaða vaksnamannaútbúgving og møguligan arbeiðsmarknaðardepil frá byrjan, so at allir partar koma at kenna sín ognarlut í hesum tríparta samstarvi.

**Fjølbroytt og breitt tilboð kring landið**

Samgongan hevur sett sær fyri, at øll skulu hava atgongd til skúlatilboð, sum eru lagað til tørvin hjá tí einstaka í eini innkluderandi skúlaskipan, har ST-sáttmálin um rættindi hjá teimum, sum bera brek, verður virdur og fylgdur. Arbeiðið at knýta serøkið tættari at gerandisdegnum hjá næminginum heldur fram. Serflokkar eftir felags leisti vera skipaðir kring landið, og komandi skúlaár verður serflokkur eisini stovnaður í Suðuroynni. Í miðnámsskúlunum verða komandi ár serbreytir til ung við serligum avbjóðingum bæði á Glasi, Kambsdali og Klaksvík.

**Kampus - hølisviðurskiftini hjá Fróðskaparsetrinum**

Samgongan hevur sett sær fyri at bøta um hølis- og lestrarviðurskiftini á Fróðskaparsetrinum. Tí varð í vetur settur ein arbeiðsbólkur, sum skuldi lýsa viðurskiftini og skriva eina frágreiðing um hesi viðurskifti. Arbeiðið er nú latið landsstýriskvinnuni, og als eingin ivi er um, at vilja vit reka okkara einasta universitet á forsvarligan og virðiligan hátt, mugu teir ytru karmarnir skipast betur skjótast til ber.

**Fíggjarligu korini hjá lesandi**

Tað er ein sannroynd, at nógvir føroyingar fara uttanlands at lesa, serliga til Danmarkar, og koma ikki aftur til Føroya. Hetta er vandakós, sum m.a. álitið um fólkaflyting og fólkavøkstur hevur víst á. Samgongan hevur sett sær fyri miðvíst at gera nakað við trupulleikan og hevur sett sær fyri at bøta um fíggjarligu korini hjá lesandi, so fleiri lesa og støðast og kunnu liva og virka í Føroyum. Komandi árini hækkar lestrarstuðulin hjá teimum, ið lesa hægri lestur, og hjá teimum við børnum, umframt at fíggjarligur styrkur verður veittur støkum uppihaldarum, sum lesa.

**Mentanarstuðulin**

Listastuðulin er hækkaður í 2016, bæði til Mentanargrunnin og til film. Vit hava í samgonguni víðari ætlanir um, at okkara listafólk skulu hava betri møguleikar at hugsavna seg um sína list. Vit hava stuðulsskipanir, sum á ymiskan hátt gera tað møguligt at virka sum listafólk, tað veri seg stuðul til eitt tiltak, eina framsýning, eina framførslu, eina útgávu og líknandi. Somuleiðis eru starvslønirnar eitt gott ískoyti hjá mongum. Fyri at gera tað liviligari verður arbeitt við einari skipan, sum veruliga skal gera mun. Vit arbeiða við eini skipan fyri yrkislistafólk, sum í eitt rímiliga langt tíðarskeið skulu kunna skapa og gera tað, sum tey hava so góð listalig evni til at gera, og sum samstundis skapar mentanarligt ríkidømi í samfelagnum.

**Filmur/filmshús**

Játtanin, sum varð sett av til film í 2014 er trífaldað í 2016, og hetta má sigast at vera skjót menning. Tað sæst eisini aftur í stóra filmsvirkseminum, sum fer fram. Fleiri føroyskir stuttfilmar verða gjørdir árliga, og arbeitt verður eisini við spælifilmsverkætlanum, sum vit væntandi skjótt fara at síggja á filmsløriftinum. Hetta er ein gongd, sum samgongan fegin vil byggja víðari á. Fleiri átøk mugu gerast fyri at fáa eina so góða samvirkan sum gjørligt, um Føroyar veruliga skulu menna seg sum filmsland, bæði sum filmsframleiðarar og sum eitt áhugavert stað at samstarva við, bæði um framleiðslur og upptøkur. Afturat filmsjáttanini verður tí arbeitt við at fáa Føroyum eitt filmshús, sum skal hava týdningarmikla leiklutin sum ein depil fyri menning, ráðgeving, samstarv, kunning, útbreiðslu o.s.fr.

**Søvnini**

Eftirmetingin av Søvnum Landsins, sum samgongan setti sær fyri at fremja, fer nú í gongd. Søvnini – tað veri seg listasøvn, mentanar- og náttúrusøgulig søvn, skjalasøvn ella bókasøvn – eru týðandi grundarsteinar í okkara samfelag. Søvnini eru vitanarstovnar, ið hava týdning fyri fólkaræðið, upplýsing og læring, men eisini fyri trivnað og inklusjón (innivist). Tað er tí avgerandi, at søvnini eru vælvirkandi og hava neyðugu orkuna til at lyfta sínar týðandi uppgávur. Eftirmetingin skal vísa á, um vit eru á rættari leið, og hvar neyðugt er at gera tillagingar.

**Talgilding**
Á savnsøkinum er talgilding ein av týðandi uppgávunum, ið landsstýrið hevur raðfest. Í juni vóru Søvn Landsins saman við Kringvarpinum og Fróðskaparsetrinum á ferð kring landið at kunna um talgilding av mentanararvinum, og hvørjar ágóðar tað hevur við sær. At samfelagið gerst alt meiri talgilt hevur stórar avbjóðingar við sær, ikki minst fyri varðveiting og rættartrygd. Tí er neyðugt at økið áhaldandi verður raðfest og ment, og at lóggávan á viðkomandi økjum verður tillagað.

**Miðlaøkið**
Øll kunnu vit verða samd um, at eitt frælst og fjølbroytt miðlalandslag hevur stóran týdning fyri fólkaræðið í einum landi. Henda samgongan vil veruliga taka tøk fyri at røkka málinum at skapa virðilig kor fyri miðlarnar.

Kringvarpsgjaldið er vorðið rættvísari. Goldið verður fyri hvønn einstakan og ikki fyri hvørt húski, og higartil hevur nýggja skipanin yvirhøvur virkað væl. Public service-sáttmálin verður sæddur sum eitt gott amboð hjá Kringvarpinum og politisku skipanini í strembanini í at røkka yvirskipaðum málum um, hvat almenni public service-stovnurin skal avrika og hví. Tí vil samgongan arbeiða fyri at fáa ein nýggjan sáttmála í gildi við komandi ársbyrjan. Endamálið er at geva brúkarunum eitt gott innihald og eina góða tænastu.

Tað er alneyðugt eisini at stuðla privatu miðlunum fíggjarliga, og ein haldgóð loysn skal finnast, sum ger tað møguligt at reka privatar miðlar og harundir at geva út tíðindabløð. Við einum styrktum miðlalandslagi, harundir stuðli til førleikamenning, røkist fyri, at journalistiska arbeiðið verður munabetri, og at samfelagskjakið verður lyft og grundað á breiðari og betur upplýst sjónarmið.

**Samfelagsfak**
Avgerð er tikin um at skipa samfelagsfak sum lærugrein frá skúlaársbyrjan í 2017. Arbeiðið at gera námsætlan og útvega undirvísingartilfar, sum er grundarlag undir at fara í holt við lærugreinina, er sett í verk. Fólkaskúlin skal gera tey ungu før fyri at taka avgerðir og vera tilvitað um samfelagsviðurskifti, og spælireglurnar í einum demokratiskum samfelag.
Lærugreinin samfelagsfrøði er ein liður í at menna og vekja áhugan hjá næmingum fyri samfelagsligum viðurskiftum, sum hava týdning fyri fólkaræðisligu tilgongdina og orðaskiftið, og at styrkja evni og sjálvsálit hjá næmingum at kjakast og taka støðu til samfelagslig umrøðuevni á fakligum støði. Umframt fakliga innihaldið at lýsa føroysk og altjóða samfelagsviðurskifti, og tann týdning, ið mentanarlig, búskaparlig og tøknilig menning hevur á samfelagsgongdina.

# LØGLISTI

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini (2016/I)**
Endamálið við uppskotinum er at nútíðargera og dagføra reglurnar um kynslig brotsverk í kap. 24 í revsilógini. M.a. verður neyðtøka víðkað til eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil, misnýtslu av persóni í hjálparleysari støðu og samlegu við børn undir 12 ár. Ásetingin um ólógligan tvingsil, misnýtslu av sálarsjúkum og onnur grov misnýtsla verður víðkað til eisini at fevna um brot framt í hjúnalagi. Fyrningarfreistin verður longd fyri ávís brotsverk, og ættleiðing og lívfrøðiligur skyldskapur verða javnsett við blóðskemd.

**Uppskot til løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (2016/I)**
Endamálið við uppskotinum er at gera reglurnar um tilhald greiðari og fáa tær beinleiðis ásettar í lógini. Eisini verður heimilað at geva landafrøðiliga avmarkað uppihaldsforboð umframt at burturvísa einum harðligum persóni úr heiminum í upp til 4 vikur.

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om pas til danske statsborgere m.v. (2016/I)**
Endamálið við uppskotinum er at dagføra passlógina í Føroyum soleiðis, at heimild verður at áseta, at umsókn um pass skal latast inn gjøgnum talgilda skipan. Umframt vanliga gjaldið fyri pass skal eisini latast eitt serstakt gjald fyri at fáa talgilt fingraprent í passið. Gjaldið fyri pass til vaksin og fyri pensjónistar, sum hava fylt 67 ár, verður dagført.

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi Anordning om ikrafttræden af lov om offentlighed i forvaltningen for sager om færøske anliggender (2016/I)**
Við hesum ríkislógartilmælinum verður Offentlighedsloven sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av føroyskum málum – bæði í Føroyum og í Danmark. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um alment innlit framvegis galdandi.

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi Anordning om ikrafttræden af lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndigheders behandling af oplysninger på Færøerne (2016/I)**
Við hesum ríkislógartilmælinum verður Lov om behandling af personoplysninger sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av persónsupplýsingum í Føroyum. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um persónsupplýsingar framvegis galdandi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarættur)**
Endamálið við uppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið persóns-, húsfólka- og arvarætt. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sbrt. § 3 í lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætt.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum útlendingaøki og marknaeftirlit)**
Endamálið við uppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið útlendingaøkið og marknaeftirlit. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar, sbrt. § 3 í lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum útlendingaøkið og marknaeftirlit.

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**
Áseting av fiskidøgum fyri fiskiárið 2016/2017 og aðrar broytingar viðvíkjandi brúksskyldu, altjóða skyldum, umsiting av veiðiloyvum o.a.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.**
Heimild til landsstýrismannin at áseta reglur um at friða fugl í kunngerð.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landbúnað**
Broytingar verða gjørdar til tess at stuðla ætlanum at gerast sjálvberandi við landbúnaðarvørum.

**Nýggj fiskivinnulóggáva (fiskivinnunýskipan)**
Nýggj lóg verður løgd fyri Løgtingið, ið skal áseta eina nýggja og varandi fiskivinnuskipan fyri Føroyar.

**Frágreiðing um tilbúgving til aðalorðaskiftis**
Tilbúgvingarlógin hevur nøkur ár á baki. Landsstýrismaðurin leggur fyri Løgtingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar mugu gerast í lógini.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (kapitalvinningsskattalógin)(enter-reglur)**
Við lógarbroyting í vár varð ein fráflytingarregla (Exit-regla) sett inn í lógina (tingmál nr. 108/2015). Broytingin hevði við sær, at persónar, ið flyta úr Føroyum, gerast skattskyldugir til Føroyar av óskattaðum kursvinningi fráflytingardagin. Víst var tá á, at tørvur eisini er á eini samsvarandi reglu við tilflyting (Enter-reglu), soleiðis at persónar, ið flyta til Føroya, ikki gerast skattskyldugir til Føroyar av kursvinningi, sum er íkomin, meðan teir búðu uttanlands.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (tonsaskattalógin)**
Lógartøkniligar og umsitingarligar broytingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya (ásetingar um inngjøld)**
Talan er um broytingar í sambandi við, at Búskapargrunnurin gerst virkin. Ásetingar vera um, hvussu gjaldast skal í grunnin og viðvíkjandi umsiting av grunninum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (ásetingarlógin)**
Endamálið við uppskotinum er at hækka barnafrádráttin fyri hvørt barnið undir skúlaaldur. Eisini verður talan um fylgibroytingar til Vinnufelagalógina og lógartekniskar broytingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.**
Endamálið við uppskotinum er at fara burtur frá núverandi vektgjaldi og til eitt meira umhvørvisgrundað gjald.

**Uppskot til løgtingslóg um Landsbanka Føroya**
Hetta er nýggj lóg í sambandi við, at Landsbanki Føroya verður endurskipaður. Endamálið við lógaruppskotinum er at styrkja samlaðu skipanina, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**
Hetta eru fylgibroytingar til lógaruppskotið um Landsbanka Føroya.

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2017**
Fíggjarlógaruppskotið fyri 2017.

**Uppskot til løgtingslóg um at keypa tænastuveitingar og tøkni til Talgildu Føroyar**
Verklagslóg í sambandi við ætlanirnar um at talgilda Føroyar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald**
Við hesum uppskoti vera El-bilar mvg-fríir í eini 2 ára royndartíð. Eisini verður talan um lógartøkniligar og umsitingarligar broytingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn**
Ásetingar viðvíkjandi tilknýti til fíggjarlóg og viðvíkjandi eftirliti. Hetta eru ásetingar, sum Landsgrannskoðanin hevur biðið um. Ætlanin er, at Bústaðir skal fáa heimild at taka lán.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (fylgibroytingar til Pensjónsnýskipan og umsitingarligar broytingar)**
Hetta eru fylgibroytingar til pensjónsnýskipanina. Eisini verður mælt til, at Almannaverkið í ávísum førum fær heimild at umsita útgjaldið fyri móttakaran.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
Við hesum verða broytingar gjørdar í játtanarskipanini viðvíkjandi, hvussu karmarnir verða býttir út á greinar og viðvíkjandi støðling av íløgujáttanum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin)**
Hetta eru fylgibroytingar til pensjónsnýskipanina. Eisini verður talan um lógartøkniligar broytingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin)**
Hetta eru broytingar í sambandi við pensjónsnýskipan. Eisini verður talan um lógartøkniligar og umsitingarligar broytingar.

**Uppskot til løgtingslóg um at skifta linkingarhátt í norðurlendsku dupultskattaavtaluni frá eksemption til kreditt**
Við hesum uppskoti verður linkingarhátturin í sambandi við norðurlendsku skattaavtaluna broyttur soleiðis, at farið verður frá ekseptións- til kredittlinking.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om finansiel virksomhed"**
Roknað verður við einari stórari dagføring av bankalóggávuni í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um elektroniskar rokningar**
Hetta er nýggj lóg. Ætlanin er, at veitarar í høvuðsheitum skulu senda landsstovnum rokningar elektroniskt. Lógaruppskotið er lagt fram fyrr (tingmál 150/2008).

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya (ásetingar um útgjøld)**
Talan er um broytingar í sambandi við, at Búskapargrunnurin gerst virkin. Ásetingar vera um, hvussu gjaldast kann úr grunninum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Realkreditstovn (Realin)**
Ætlanin er at endurskoða og dagføra lógargrundarlagið.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skásetingargjald á motorakførum**
Við uppskotinum er ætlanin at gera skrásetingargjaldið meira grundað á teknisk virðir.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins**
Ásetingar um anonymitet og lógartøknilig broyting viðvíkjandi suspensión.

**Uppskot til løgtingslóg um varskógvaraskipan**
Hetta er nýggj lóg. Ætlanin er at seta í verk eina varskógvaraskipan fyri almenn starvsfólk. Við nýggju skipanini fáa almenn starvsfólk møguleika at gera vart við óreglusemi ella lógarbrot dulnevnd.

**Uppskot til løgtingslóg um endurgjald fyri framleiðsluútreiðslur í sambandi við filmsgerð**
Hetta er nýggj lóg, har ætlanin er, at útlendsk feløg, ið gera filmsupptøkur í Føroyum, skulu fáa endurgoldið part av útreiðslunum, um tey lúka ávísar treytir. Endamálið er at fáa útlendskar filmsverkætlanir til Føroya.

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2018**

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m.**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at áseta nýggjar og endurskoðaðar reglur um eigaraavmarkingar og um útlendskan eigaraskap.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um djórasjúkur**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at áseta reglur um almannakunngerð av upplýsingum um lúsateljingar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin)**
Endamálið við uppskotinum er at áseta reglur, sum skulu forða fyri, at partafeløg verða nýtt til at royna at sleppa undan skatti. Fyri at forða fyri m.a. skattaskjóli verður møguleikin sambært lógini at geva út handhavapartabrøv strikaður. Harafturat verða ásetingarnar í lógini um upplýsingar um veruligu eigararnar broyttar. Eigari av handhavapartabrøvum kann vera ókendur fyri felagið og almennar myndugleikar, og hevur m.a. OECD víst á, at handhavapartabrøv kunnu nýtast til at dylja eigaraviðurskiftini og við tí royna at sleppa sær undan skatting.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kongligari fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av "lov om visse erhvervsdrivende virksomheder" (vinnufyritøkulógin)**
Endamálið við uppskotinum er at gera somu broytingar, sum lagt verður upp til at gera í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógini), um handhavarapartabrøv og um upplýsingar um veruligar eigarar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kongaligari fyriskipan fyri Føroyar av "lov om erhvervsdrivende fonde" (lógin um vinnurekandi grunnar)**
Endamálið við uppskotinum er at gera somu broytingar, sum lagt verður upp til at gera í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógini), um upplýsingar um veruligar eigarar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvasking av vinningi og fígging av yvirgangi**
Endamálið við uppskotinum er at gera somu broytingar, sum lagt verður upp til at gera í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógini), um handhavarapartabrøv.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
Endamálið við uppskotinum er at áseta reglur um upplýsingar um veruligar eigarar og at gera aðrar dagføringar m.a. um grundleggjandi skeið fyri nevndarlimir í tryggingarfyritøkum.

**Uppskot til løgtingslóg um bókhald (bókhaldslógin)**
Uppskotið avloysir galdandi løgtingslóg um bókhaldsskyldu frá 1978 og kunngerð um minstukrøv til bókhald og roknskap frá 1993, soleiðis at reglurnar í mestan mun verða savnaðar á einum stað. Uppskotið hevur til endamáls at seta nýggjar og tíðarhóskandi reglur fyri bókhald og bókhaldsvirksemi annars.

**Uppskot til løgtingslóg um vernd av djórum**
Uppskotið avloysir galdandi løgtingslóg um vernd av dýrum frá 1985. Uppskotið hevur til endamáls at dagføra reglurnar um djórahald og djóravernd.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um starvsviðurskifti hjá sjófólki**
Endamálið við uppskotinum er at gera broytingar í lógini, soleiðis at lóggávan verður í samsvari við seinastu broytingarnar í altjóða sáttmálanum frá ILO "Maritime Labour Convention", sum koma í gildi 1. januar 2017. Endamálið við broytingunum er at veita sjófólki størri fíggjarliga trygd í teimum førum, tá ið reiðarin hevur framt grovt mishald á setanaravtaluna.

**Uppskot til løgtinglóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum**
Endamálið er m.a. at dagføra reglurnar um kanning av vanlukkum á sjónum og at gera aðrar dagføringar í lógini.

**Uppskot til løgtingslóg um mynstring ella uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um mynstring**
Endamálið við uppskotinum er at nútíðargera lógina. Sjóvinnustýrið hevur í 2015 yvirtikið alt eftirlitið við mynstringum og hevur síðani tikið eina elektroniska skipan í nýtslu til hetta endamálið.

**Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi "Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan"**
Uppskotið hevur einans til endamáls at seta Hoyvíkssáttmálan úr gildi sum lóg í Føroyum. Orsøkin er, at mett verður, at sáttmálin er implementeraður í aðrari lóggávu. Lógarbroytingin hevur ongan týdning fyri sáttmálaviðurskiftini millum Føroyar og Ísland og tær altjóða rættarligu bindingar, sum eru galdandi millum londini sambært nevnda sáttmála.

**Uppskot til løgtingslóg um matstovur o.tíl. (matstovulógin)**
Farið verður undir at gera uppskot til matstovulóg, sum á einum stað skipar tær reglur, sum eru galdandi fyri matstovu- og skeinkingarvirksemi. Hesar reglur eru í dag skipaðar í aðrari lóggávu, m.a. politiviðtøkunum, rúsdrekkalógini o.ø.

**Frágreiðing um politikk fyri skapandi vinnur til aðalorðaskiftis**
Í januar mánaði 2014 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at fyrireika og leggja frágreiðing fyri Løgtingið um politikk fyri skapandi vinnur. Politikkurin er nú orðaður, og verður málið lagt fyri Løgtingið til aðalorðaskifti í heyst. Raðfestu átøkini verða nærri greinað til fíggjarlógarviðgerðina fyri 2017.

**Frágreiðing um eigarapolitikk til aðalorðaskiftis og uppskot til løgtingslóg um at seta reglurnar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi**
Løgtingið samtykti á vári 2015 uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at heita á landsstýrið at leggja frágreiðing fyri Løgtingið um virkiseindir, sum ikki eru við í fíggjarlóg, men sum landið eigur ella á líknandi hátt luttekur í, og at seta í verk átøk og fyriskipanir, sum skulu tryggja, at áhugamálini hjá virkiseindunum verða røkt á forsvarligan hátt. Frágreiðing verður nú løgd fyri Løgtingið um eigarapolitikk og um uppskot um at seta reglurnar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í útlendingalógini (t.e. Anordning nr. 182 af 22. marts 2001 for ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven, sum seinast broytt við anordning nr. 677 frá 17. juni 2013).**
Endamálið við lógaruppskotinum er at nágreina, hvørjir føroyskir myndugleikar eftir yvirtøkuna av málsøkinum útlendingamál og marknaðeftirlit hava tær ymsu heimildirnar og skyldurnar á málsøkinum, sum sbrt. verandi lóggávu liggja hjá donskum myndugleikum. Gjørdar verða ikki stórvegis innihaldsligar broytingar í samband við yvirtøkuna.

## SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing**
Málið kemur í kjalarvørrinum av eini avgerð, sum Løgtingsins umboðsmaður tók, um at ALS hevði drigið hjúnafelagaeftirløn frá í arbeiðsloysisstuðlinum. Ætlanin er at nágreina § 16, stk. 2 í lógini, soleiðis at tað bert eru egnar tænastumannapensiónir og eftirlønir, sum verða drignar frá í arbeiðsloysisstuðlinum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslógakunngerð um ferðslu**
Endamálið er at broyta reglurnar um, hvør kann fáa elektroniska atgongd til akfarsskránna hjá Akstovuni, hvørjar upplýsingar kunnu latast, og ásetingar um gjøld fyri upplýsingar. Aldursmarkið verður hækkað fyri at endurnýggja koyrikort til bil við nýggjari læknváttan (frá 70 – 75 ár). Reglur um frádøming av rættinum at virka sum koyrilærari verða greiðari. Krøvini til góðkenning sum koyrilærari verða broytt – kravd eftirútbúgving og at dagføra sektaruppskot v.m.

**Uppskot til løgtingslóg um havnir v.m.**
Endamálið er m.a. at gera lógaruppskot, sum m.a. umfatar skipan av bygging, viðlíkahald og niðurtøku av havnum v.m., skyldur hjá havnum, ásetingar um skilhald og yvirskipaðar reglur um nýtslu av sjóøkinum, herundir ásetingar um havnaøki/redir, skipan av akkersplássum, kaðlar og rørleiðingar innan- og uttanoyggja v.m.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útjavningarstuðul til útjaðaraøki**
Endamálið við lógini er at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta farm hjá fastbúgvandi á útoyggj. Sambandið millum oyggjarnar er broytt nógv seinnu árini, soleiðis at tørvur er á at endurskoða, hvørjar oyggjar eiga at koma undir skipanina.

## ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot um pensjónsnýskipan**
Arbeitt verður við at gera nýggja pensjónsskipan, sum skal tryggja øllum góða pensjón og samstundis rætta ójavnar og haldsføristrupulleikar. Miðað verður eftir at leggja lógarpakka fyri Løgtingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um tænastu (tænastulógin)**
Hetta er nýggj høvuðslóg, ið m.a. kemur í staðin fyri reglurnar í forsorgarlógini um tænastur til fólk við breki. Lógin verður kallað "Tænastulógin" og fer at savna allar reglurnar og rættindini í sambandi við tænastur til fólk við breki.

**Uppskot til løgtingslóg um umbyggjan av Eirargarði 14/16**
Endmálið er at fáa heimild at nútímansgera Eirargarð 14/16. Bygningurin er í dag ikki mettur at vera væl egnaður til bústað ella námsfrøðiligt virksemi. Fleiri av búfólkunum hava tørv á hjálpitólum, sum illa rúmast í kømrunum. Á Eirargarði búgva fólk í aldrinum 23-80 ár. Búfólkini hava egið kamar umframt felagsøkir. 4-5 búfólk eru felags um eitt baðirúm. Bygningurin er frá 1980, og er fyrsti og einasti bygningur til fólk við menningartarni, sum er bygdur til endamálið í Suðurstreymoy.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu**
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni heimild til at fara at byggja eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu. Talan er um eina búeind við 6 búplássum, eina umlættingareind við 6 plássum og eitt dagtilboð til áleið 16 børn og ung.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útleigan av bústøðum**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at leingja uppsagnarfreistina fyri útleigarar. Tá leigulógin varð smíðað, var einki alment bústaðafelag. Lógin tekur bert støði í privata leigumarknaðinum. Smærri tillagingar verða tí gjørdar, ið leggja upp fyri almenna bústaðafelagnum, eitt nú í mun til at góðkenna uppsøgn av leigumáli.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um forsorg**
Endamálið er at bøta um umstøðurnar hjá heimabúgvandi ungum við heilsuligum avbjóðingum. § 9, stk. 2, nr. 6 í forsorgarlógini verður broytt, soleiðis at forsorgarveiting til heimabúgvandi ung hækkar við 1.500 kr. um mánaðin, so mánaðarliga tøka upphæddin verður stívliga 3 tkr. Hetta hevur við sær, at árligu útreiðslur landskassans hækka við umleið 450.000 kr. Harumframt er ætlanin at broyta § 17, stk. 3 í forsorgarlógini, soleiðis at foreldur at børnum, sum búgva á stovni, eisini kunnu fáa endurgjald vegna inntøkumiss í sambandi við sjúkrahúsviðgerð.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk**
Endamálið er, at kvinnur, sum verða við barn, varðveita veitingina, meðan tær eru í barnsburðarfarloyvi. Harumframt er ætlanin at leggja heimildina fyri vardum starvi o.a. sambært forsorgarlógini yvir í lógina um arbeiðsfremjandi tiltøk, so allar útreiðslurnar kunnu leggjast undir eina og somu høvuðskontu í fíggjarlógini.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkradagpengar**
Ætlanin er at dagføra reglurnar um m.a. sjálvbodna trygging, so eginfíggingin kemur í eina fasta hóskandi legu. Somuleiðis skulu persónar við egnum felag eins og sjálvstøðug vinnurekandi kunna tekna trygging. Í sambandi við fíggjarkarmarnar fyri 2017 er ætlanin, at gjaldsbýtið av sjúkradøgum millum tað almenna og arbeiðsgevarar verður eitt sindur javnari býtt. Korini hjá persónum, sum koma undir longrivarandi sjúkuviðgerð, skulu betrast. Veitingarskeiðið v.m. hjá fyritíðarpensjónistum skal tillagast tørvinum. Lógin um sjúkratrygd til fiskimenn verður innarbeidd í dagpeningalógina, so veitingin vegna inntøkumiss í sambandi við óarbeiðsføri verður savnað í eina og somu lóg. Lógin um sjúkratrygd til fiskimenn verður tí sett úr gildi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar**
Barnagjaldið er eitt fíggjarligt trygdarnet til børn, sum bert hava ein uppihaldara. Eftir galdandi lóggávu, verður mismunur gjørdur millum børn vegna upphav. Stakir persónar kunnu ættleiða børn, eins og til ber hjá støkum kvinnum við ísáðing, at fáa børn. Persónar, ið sum støk hava ættleitt barn ella fingið ísáðing, hava ikki nakran at krevja eftir gjaldi sambært lóg um rættarstøðu barnanna. Hesi eru heldur ikki at meta sum at hava mist ein uppihaldara, og hava hesi, sum lógin um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. er orðað, tí heldur ikki rætt til barnagjald til einsamallar uppihaldarar. Við uppskotinum verða øll børn javnsett í mun til rættin at fáa barnagjald, eins og lógin verður dagførd.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Í áliti viðvíkjandi klagu um vantandi rættartrygd hjá nýføddum barni hevur Løgtingsins Umboðsmaður mett, at tørvur er á ásetingum í barnaverndarlógini um privata døgnrøkt, sum gera tað møguligt hjá foreldramyndugleikahavara at gera privatrættarliga avtalu um døgnrøkt av barni við góðkenning og eftirliti frá skikkaðum myndugleika. Barnaverndarlógin verður tillagað samsvarandi hesum.

**Frágreiðing um javnstøðupolitikk til aðalorðaskiftis**
Frágreiðing um javnstøðupolitikkin verður løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti seint í komandi tingsetu.

## HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um etiskt ráð**
Endamálið við uppskotinum er at seta á stovn eitt etiskt ráð í Føroyum og áseta neyvari, hvussu ráðið verður valt, og hvørjum kørmum eitt tílíkt óheft ráð skal virka undir. Ætlanin er, at ráðið í høvuðsheitum skal ráðgeva Løgtinginum og heilsumyndugleikum í etiskum spurningum. Eisini skal ráðið vera við til at fáa kjak í lag um m.a. ílegugransking og ílegutøkni, ið er viðkomandi fyri fólk her á landi.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Sundhedsloven"**
Arbeitt verður í løtuni við at seta teir partar av "Sundhedsloven" í gildi í Føroyum, sum kunnu setast í gildi við kongligari fyriskipan. Orsøkin er millum annað, at tað er trupult at dagføra ein stóran part av donsku heilsulóggávuni, sum er galdandi í Føroyum í dag, tí lógirnar eru vorðnar partar av "Sundhedsloven".

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed"**
Stórar broytingar verða í løtuni framdar í donsku autorisatiónslógini, sum m.a. heimila, at Sundhedsstyrelsen fer at hava organisatoriskt eftirlit við heilsuverkinum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á málsøkinum persóns-,húsfólka- og arvarættur (broytingar vegna yvirtøku av málsøkinum)**
Endamálið við lógaruppskotinum er at nágreina, hvørjir føroyskir myndugleikar eftir yvirtøkuna av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti hava tær ymsu heimildirnar og skyldurnar á málsøkinum, sum sbrt. verandi lóggávu liggja hjá donskum myndugleikum. Ongar innihaldsligar broytingar verða gjørdar á málsøkinum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tiltøk at minka um royking (roykilógin)**
Endamálið við uppskotinum er at seta tiltøk í verk at minka heilsuskaðar og heilsuvandar, ið standast av tubbaksroyking. Hóast fleiri tiltøk eru sett í verk, hava tey ikki verið nóg munadygg. Tørvur er tí á at seta enn munadyggari tiltøk í verk.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**
Endamálið við uppskotinum er at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um fyribyrgjandi heilsukanningar, sum verða veittar teimum við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Hetta verður gjørt við, at heilsufrøðingar fáa heimild til at fremja nevndu kanning. Kommunulæknar varðveita sína heimild til at fremja hesar kanningar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd**
Endamálið við uppskotinum er at broyta lógina, so tað verður nágreinað, hvør hevur rætt til veitingar sambært henni. Sum tiltak í sambandi við játtanarkarmin fyri 2017 er ætlanin at fremja tillagingar í løgtingslóg um heilsutrygd.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið**
Í sambandi við dagføring av verklagslóg í 2013 varð mett, at ov tíðliga var at samtykkja dagføring viðvíkjandi prísvøkstri til verklagið. Tilboð eru nú komin, og verður uppskot, ið leggur upp fyri prísvøkstri og øðrum dagføringum, lagt fyri Løgtingið um dagføring av lógargrundarlagnum fyri verkætlanini.

**Uppskot til løgtingslóg um náttúruverndi**
Endamálið við nýggju lógini er at skipa eina nútíðarligari náttúruvernd, sum í størri mun byggir á atlit at djóra- og plantusløgum á landi og sjógvi. Yvirskipaða endamálið verður at varðveita og verja margfeldið í náttúruni, samstundis sum pláss verður at menna samfelagið.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya**
Endamálið við einum politikki á økinum er at fyribyrgja og tálma nýtsluna av rúsdrekka og rúsevnum. At menna og víðka viðgerðartilboðini til misnýtarar og avvarðandi og at minka um medisinsku og sosialu skaðaárinini av misnýtslu. Ætlanini er at fáa sett í verk ítøkilig átøk, sum skulu gjøgnumførast árini 2016-2020.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið**
Endamálið er at skifta orð um, hvørjar grundleggjandi viðgerðir og tænastur skulu vera í føroyska sjúkrahúsverkinum, og hvussu tær skulu skipast millum sjúkrahúsini. Eisini er tørvur á at viðgera, hvussu læknar og onnur heilsustarvsfólk kunnu útvegast og mennast til føroyska sjúkrahúsverkið umframt, hvat fíggjarligi tørvurin er fyri at kunna hava neyðugt rásarúm til at veita heilsutænastur á hægsta stigi.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**
Endamálið við uppskotinum er at hækka stuðulsupphæddirnar til fólk í hægri lestri og til lesandi forsyrgjarar.

**Uppskot til løgtingslóg um miðlastuðul (miðlastuðulslóg)**
Endamálið við uppskotinum er at fáa heimild at veita stuðul til privatar miðlar.

**Uppskot til løgtingslóg um musealt savnsvirksemi (savnslógin)**
Lóg um musealt virksemi kemur í staðin fyri løgtingslóg um fornminnissavn og løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar**
Lógin verður tillagað, soleiðis at musikkskúlaskipanin kann verða fyrisitin á skynsamasta hátt saman við kommununum.

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Endamálið við uppskotinum er at gera samfelagsfak til kravda lærugrein í fólkaskúlanum. Møguliga verða tillagingar eisini gjørdar í bygnaðinum í fólkaskúlanum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gransking**
Lógin verður endurskoðað. Hugt verður at bygnaðarligu viðurskiftunum innan granskingarøkið, fyrisiting av stuðli til gransking, menning og nýskapan sum heild, um skilmarking av hugtøkum og um skipanina við Vísindaráðnum.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um mentanarstuðul**
Endamálið er at betra um viðurskiftini hjá yrkislistafólki, soleiðis at tey fáa betri umstøður at hugsavna seg um sína list í longri tíðarskeið.

**Uppskot til løgtingslóg um eftirskúla í Suðuroy**
Hetta er verklagslóg um eftirskúla í Suðuroy.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn**
Endamálið við uppskotinum er at tillaga lógina í sambandi við handfaring av talgildum savnindum, avhending, varðveitslu og vraking v.m.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum, 1. januar, 1985 til 2016 ... 51
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2015 ... 51
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til apríl 2016 ... 51
**Mynd 4:** Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, apríl 1995 til november 2015 ... 52
**Mynd 5:** Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, januar 1985 til mars 2016 ... 52
**Mynd 6:** Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfj. 1985 til 1. ársfj. 2016 ... 52
**Mynd 7:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2017 ... 53
**Mynd 8:** Brúkaraprístalið, 2001 til 2016, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100 ... 53
**Mynd 9:** Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2016 ... 53
**Mynd 10:** Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2016 ... 54
**Mynd 11:** Laksur og síl tikin skift á ár og slag, tús. tons, 1996 til 2015 ... 54
**Mynd 12:** Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2015 ... 54
**Mynd 13:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, januar 1998 til mars 2016 ... 55
**Mynd 14:** Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2015 ... 55
**Mynd 15:** Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2016 ... 55
**Mynd 16:** Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar) í % av BTÚ, 1998 til 2013 ... 56
**Mynd 17:** Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2015 ... 56
**Mynd 18:** Útgoldin A-inntøka umvegis a-skattaskipanina, mió. kr., 1993 til 2015 ... 56
**Mynd 19:** Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013 ... 57
**Mynd 20:** Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2015 ... 57
**Mynd 21:** Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, í mió. kr., 1998 til 2013 ... 57
**Mynd 22:** Brutto- og nettoskuld hjá føroyskum kommunum og kommunuskattur, mió. kr., 1993 til 2013 ... 58
**Mynd 23:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2016 ... 58
**Mynd 24:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2016 ... 58
**Mynd 25:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2016 ... 59
**Mynd 26:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2016 ... 59
**Mynd 27:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2016 ... 59
**Mynd 28:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2016 ... 60

Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum, 1. januar, 1985 til 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til apríl 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 4: Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, apríl 1995 til november 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 5: Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, januar 1985 til mars 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 6: Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfj. 1985 til 1. ársfj. 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 7: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2017




* Tølini fyri 2014 til 2017 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Fíggjarmálaráðnum og Búskaparráðnum.

Mynd 8: Brúkaraprístalið, 2001 til 2016, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan

Mynd 9: Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 10: Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 11: Laksur og síl tikin skift á ár og slag, tús. tons, 1996 til 2015




Kelda: Hagstovan

Mynd 12: Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2015




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 13: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, januar 1998 til mars 2016




Kelda: Hagstovan

Mynd 14: Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2015




* Tølini fyri 2013 til 2015 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og Fíggjarmálaráðið.

Mynd 15: Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2016




Viðm.: Tølini fram til og við 2015 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2016 eru fíggjarlógartøl.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 16: Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar) í % av BTÚ, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 17: Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2015




Kelda: TAKS

Mynd 18: Útgoldin A-inntøka umvegis a-skattaskipanina, mió. kr., 1993 til 2015




Kelda: TAKS

Mynd 19: Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 20: Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2015




Kelda: Gjaldstovan

Mynd 21: Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá føroyskum kommunum, í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan

Mynd 22: Brutto- og nettoskuld hjá føroyskum kommunum og kommunuskattur, mió. kr., 1993 til 2013




Kelda: Hagstovan og TAKS

Mynd 23: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 24: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 25: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 26: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd: 27: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið

Mynd 28: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2016




Kelda: Fíggjarmálaráðið